# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið

Nr. 28 - Juli 2016



Merkið framvegis hentleikaflagg

Tema:
Sjóvinnustýrið/FAS

Ónógd um sjúkradagpengar

Tema:
Skatta-FAS

LÍV-keypið komið undir land

Fyrsti loðstúrurin

Maritimar bachelor-útbúgvingar í dvala

ODDAGREIN

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið

**Blaðnevnd**
Páll Hansen, ábyrgd
Annfinnur Garðalíð
Jóan Petur Patursson
Elias Zachariassen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Føroya Skipara- & Navigatørfelag**
Smærugøta 9 A
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**Blaðhald**
Tey sum ynska at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst. MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**Forsíðumynd**
Øssur Winthereig

**Umsiting og redaksjón**
**Press:** press@press.fo,
Øssur Winthereig, ossur@press.fo
tel. 218486
Ingolf S. Olsen, ingolf@press.fo
tel. 225077
Grækaris D. Magnussen, grakaris@press.fo
tel. 514444

**Umbróting,**
Jan Jacobsen, Prenta

**Prent og liðugtgerð**
Prenta 35 77 74

Upplag: 1800



Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag og limur í blaðnevndini.
*Mynd: Grækaris D. Magnussen*

# Alt ov vánalig sjúkratrygd

Okkara fiskimenn og -kvinnur eru alt ov illa tryggjað ímóti inntøkumissi, tá tey koma illa fyri og gerast sjúk.

60 prosent av einari arbeiðaraløn, tað er tað, sum fáast kann, so leingi til ber at fáa nakað úr fyrst Trygdargrunninum og síðani um dagpengaskipanina.

Ein arbeiðaraløn er grundað á 40 tímar arbeiðsviku, men øll vita, at umborð á skipi er arbeiðstíðin ein heilt onnur. Einir 100-110 tímar um vikuna er tað mest vanliga har.

Tí er tað púra burturvið, at sjúkradagpengarnir hjá okkara fiskimonnum og -kvinnum er grundað á eina arbeiðaraløn á landi, og veruligi inntøkumissurin kann eisini ógvuliga sjáldan metast upp ímóti eini arbeiðaraløn.

Men eins væl og vit hava eina minstuløn á landi, sáttmálasettu arbeiðaralønina, so hava vit eina tilsvarandi umborð á okkara fiskiskipum, nevniliga minstulønina. Hon er 1050 krónur um dagin.

Sjúkratrygdin hjá fiskimonnum og -kvinnum eigur tí sjálvsagt at taka støði í hesi minstulønini. Alt annað er høpisleyst, og útgjaldið eigur at vera full minstuløn sjey dagar um vikuna, so leingi sjúkraskrivingin varar, tí næstan altíð er fortjenastan umborð nógv hægri enn minstalønin.



**Annfinnur Garðalíð**
formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag































# INNIHALD


4 **Visjón um einar bláar Føroyar**
Góð og skjót tænasta, høgt altjóða støði og kompetent eftirlit.

8 **FAS grundvøllur undir vitanarvinnu**

10 **Tveir kasjettar**
Stjórin í FAS og stjórin í Skipaeftirlitinum er ein og sami persónur.

12 **FAS kappast við skeiv lond**
Skipaumboðsmaður fýlist á strategiina hjá FAS.

14 **Umboðsmenn taka yvir**
Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum heldur FAS kasta ov lítið av sær.

15 **Skatta-FAS er ein óheppin skipan**
Fyrrverandi skattastjóri heldur tíðina verða farna frá serligum skattafyrimuni.

17 **Skatta-FAS skýrt at vera snúltari**
Manningarfeløgini argast inn á skattafyrimun.

18 **Bólturin liggur hjá myndugleikunum**
FMU heldur seg ikki kunna gera meira fyri at fáa merkið strikað sum hentleikaflagg.

19 **FAS-stjórin: Eg fái onki gjørt við ITF**

20 **Manningarfeløgini mugu vera meira áhaldin í ITF**
RRF-ráðgevi heldur ikki, at FMU hevur gjørt nóg mikið.

22 **Maritimar útbúgvingar ligið í dvala**
Seinastu árini hevur lítið verið at hoyrt til maritimu bachelor-útbúgvingarnar.

24 **Manningarfeløg: Bachelor í sjóvinnuútbúgvingunum**
Yvirmannafeløgini ynskja sjóvinnuútbúgvingar á bachelor-støði.

26 **Vinnuháskúlin er til reiðar**
Vinnuháskúlin er til reiðar til bachelor-útbúgvingar.

28 **Fyrsti loðstúrur hjá Jákupi Jørgensen**
Mið & Magn á túri við loðsinum í Fuglafirði.

30 **Nú verður LÍV keypt**

32 **Hvílitíðin í fokus á NMF-fundi**

33 **Navigatørar brynjaðir til samráðingar**

34 **Prógvhandan: 31 fingu prógv**

38 **Brot úr dagbók**
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum.

39 **Brot úr dagbók**
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum.

40 **Brennidepilin**
Høgni Hansen.

43 **Sjúkradagpengarnir til sjófólk eiga at broytast**

43 **Smidligari skipan**

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*





Sjóvinnustýrið í Vágum heldur fyribils til her á vinnuøkinum omanfyri flogvøllin í Sørvági, meðan høvuðssætið í Miðvági verður umvælt.

Fyri stutt síðani flutti Skipaskrásetingin og FAS úr hølunum á Skálatrøð og í niðastu hædd her undir Bryggjubakka í Havn.

# Visjón um einar bláar Føroyar

**Góð og skjót tænasta, høgt altjóða støði og kompetent eftirlit. Tað er soleiðis Sjóvinnustýrið fegið vil síggjast í sjóvinnuhøpi bæði úti og heima. Stjórin hevur nevniliga eina visjón um einar bláar Føroyar – einar Føroyar sum altjóða sjóvinnudepil.**

20 fólk til samans, sum skulu skráseta alt, sum flýtur í Føroyum, frá smáum jollum til Norrønu, sum skulu hava eftirlit við okkara 470 fiskiførum og handilsskipum (sambært Føroya Skipaskrá) og teimum 89 handilsskipunum í Føroya Altjóða Skipaskráseting, FAS, sum skulu avgreiða allar mynstringar og manningarskjøl á føroyskum skipum, sum skulu smíða uppskot til reglur og lógir, sum skulu samskifta við bæði heimligar og útlendskar myndugleikar um alt, sum hevur við okkara sjóvinnu og atknýttu reglur og lógir at gera, og sum skulu marknaðarføra føroyska sjóvinnu og FAS.

Jú, tey renna skjótt í Sjóvinnustýrinum, og stjórin, Hans Johannes á Brúgv, dylir ikki, at hann fegin hevði viljað havt orku til uppaftur meira. Tí visjónin er, at Føroyar skulu menna seg til ein maritiman depil í Norðuratlantshavi, og almennu grundsúlurnar undir hesi menning eru Skipaeftirlitið, Føroya Skipaskráseting og Føroya Altjóða Skipaskráseting, FAS, sum í 2010 vórðu løgd saman í tað, sum nú eitur Sjóvinnustýrið.

### Draga eina línu

Hans Johannes á Brúgv er tískil bæði stjóri fyri Skipaeftirlitinum og fyri FAS, hvørs virksemi á mangan hátt er flættað saman, tó at Skipaeftirlitið eisini er eftirlitsmyndugleikin, sum skal halda eygað við FAS-skipunum.

- Tá tað snýr seg um at menna og marknaðarføra føroysku sjóvinnuna, draga Skipaeftirlitið og FAS ofta eina línu. Stórur partur av virkseminum í øllum Sjóvinnustýrinum er beinleiðis avleitt av FAS. Tí er tað eisini ein fyrimunur, at eg eri stjóri á báðum stovnunum, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Hann skilir heldur ikki ímillum stjórasessirnar, tá tað snýr seg um at menna og marknaðarføra føroyska sjóvinnu.

- Danir hava ein maritiman vinnupolitikk, ið tey rópa "Det blå Danmark", og eg havi somu visjónir um okkara framtíðar sjóvinnu – einar bláar Føroyar. Bæði í FAS og í restini av Sjóvinnustýrinum gera vit hvønn dag

heldur fram á næstu síðu >

okkara besta at slóða fyri, og vónandi fer eisini nógv ítøkiligt at spyrjast burturúr, nú uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur sett hol á at leggja eina maritima strategi og orða ein politikk á økinum, sigur Hans Johannes á Brúgv, ið eisini sjálvur situr í arbeiðsbólkinum, sum í heyst skal koma við einum tilmæli um strategi og politikk á økinum.

**Synergi er lyklaorðið**

Synergi er eitt lyklaorð hjá stjóranum, og hann leggur dent á, at sjálvt talið av skipum í FAS ikki er avgerandi fyri menningini av føroysku sjóvinnuni og hennara avleiddu vinnum.

- Føroyingar hava altíð siglt og fingist við skip og sjógv, og í mun til fólkatalið hava vit sera nógv vælútbúgvin sjófólk. Tey sigla um allan heimin við reiðaríum úr øllum heiminum, og hvørt einstakt sjófólk er ein virðismikil ambassadørur. Vit skulu bara verða betri til at brúka tey, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Men 20 fólk at loysa allar uppgávurnar og veita allar tænasturnar, sum krevjast fyri at hava eina vælvirkandi og vaksandi sjóvinnu, ljóðar ikki av nógvum, og skulu vit heilt upp á tað støðið, ið stjórin ynskir, so er neyðugt við meira orku bæði í fólki og pengum.

## SJÓVINNUSTÝRIÐ

19 ársverk og 20 starvsfólk eru í Sjóvinnustýrinum/FAS umframt stjóran.

Á samskiftis-, løgfrøði og skrásetingardeildini eru tey seks, harav tey trý, Skipaskrásetingin og leiðsluskrivarin, eru á deildini í Havn.

Á umsitingar- og manningardeildini eru tey sjey.

Og á Skipaeftirlitinum (sýnsdeildini) eru tey sjey.

## PARIS MOU

Paris Mou - Paris Memorandum of Understanding - er evropeiskur felagsskapur, sum fremur eftirlit við og flokkar skip, sum sigla í Evropa og í Norðuratlantshavinum. Eftirlitið fevnir um trygd, umhvørviskrøv og arbeiðsviðurskifti umborð. Sjálvt um skipini verða kannað hvørt sær, so eru tað flaggstatirnir, ið verða flokkaðir í annaðhvørt hvíta, gráa ella svarta listan. Tað merkir, at í til dømis Føroyum, ið hevur fá skip, kann bara eitt skip, ið verður illa rikið, hála flaggið niður eftir listanum og í ringasta føri av hvítalista.

Síðani 2011, tá føroyska flaggið kom á hvítalista, hevur tað tó trygt flutt seg upp eftir listanum.

## ENDURNÝGGIÐ SJÓVINNUBRÆV ÁÐRENN 1. SEPTEMBER 2016

Sjóvinnustýrið hevur í miðlunum kunnað um, at tey sjófólk, sum skulu endurnýggja sjóvinnubrøvini áðrenn 1. januar 2017, mugu søkja Sjóvinnustýrið áðrenn 1. september 2016.

Tey sjófólk, sum ynskja at tryggja sær, at sjóvinnubrævið verður útskrivað áðrenn 1. januar 2017 sambært STCW 2010, mugu søkja um sjóvinnubræv áðrenn 1. september 2016, annars kann Sjóvinnustýrið ikki tryggja, at sjófólk fáa sjóvinnubrævið áðrenn 1. januar 2017.

Navigatørar við handilsskipum og øll maskinfólk eru fevnd av krøvunum sambært STCW 2010.



Deildin hjá Sjóvinnustýrinum í Havn. Úr vinstru eru tað Mikkjal N. J. Olsen, sýnsmaður, Skipaeftirlitið, Sunneva Davidsen, skrivstovufulltrúi, Skipaskrásetingin, Guðrun Øster, leiðsluskrivari, og Randarsól Mohr, skrivstovufulltrúi, Skipaskrásetingin. Mikkjal N. J. Olsen er partur av Skipaeftirlitinum í Vágum, men er ein dag um vikuna á deildini í Havn.

tekstur og myndir: INGOLF S. OLSEN -PRESS



Ása T. Djurhuus og Anly Sandberg Joensen, løgfrøðingar, hava úr at gera á Samskiftis-, løgfrøði- og skrásetingardeildini hjá Sjóvinnustýrinum í Vágum.







Andreea-Lygia Popescu, málsviðgeri, Kirstin Johannesen, skrivstovufólk, og Eyðgerð Mørkøre Kruse, málsviðgeri, arbeiða allar á umsitingar- og manningardeildini í Vágum.

**Á hvítalista**

Eftir tógvið stríð og tætt samstarv millum reiðaríini, FAS og Sjóvinnustýrið annars eydnaðist tað fyri fimm árum síðani at koma á hvíta listan hjá felagsskapinum Paris Mou, sum við jøvnum millumbilum kannar øll skip, ið koma í havn í teimum londunum, sum eru limir í Paris Mou.

Síðani Føroyar komu á hvítalistan í 2011, er karakterurin hjá føroyskt skrásettu skipunum bara batnaður. Men Føroyar hava tó ikki limaskap í Paris Mou.

- At gerast limur har er eitt greitt ynski hjá mær, men til tað krevst, at serliga sýnsdeildin – Skipaeftirlitið – verður uppraðfest við fólki, tí sum limur í Paris Mou skulu vit millum annað gera krevjandi PSC-kanningar av útlendskum skipum, sum koma í føroyska havn.

PSC stendur fyri Port of State Control, og tað eru hesar umfatandi kanningarnar av trygdar-, umhvørvis- og arbeiðsumstøðunum umborð, sum í seinasta enda gera av, á hvørjum lista hjá Paris Mou eitt flagg kemur at standa – hvíta, gráa ella svarta lista.

- Í dag eru okkara førleikar serliga grundaðir á verandi skip, men verða vit limur í Paris Mou, noyðast vit eisini at vaksa um okkara starvsfólkahóp og víðka okkara førleikar, sigur Hans Johannes á Brúgv.

**Ábyrgd og førleikar**

Í dag gera klassingarfyritøkur sum til dømis DNV/GL og Bureau Veritas meginpartin av ítøkiliga arbeiðinum at hava eftirlit við tekniska standinum hjá skipunum í øllum heiminum, men evstu ábyrgdina fyri, at skip undir føroyskum flaggi lúka trygdar- og umhvørviskrøvini, eigur Sjóvinnustýrið.

Eftir at Skipaeftirlitið bleiv yvirtikið sum føroyskt sermál í 2002, bleiv alt sýnsarbeiði fyri skip yvir 24 metrar útveitt til klassafeløgini. Tað er eitt ynski hjá Sjóvinnustýrinum at taka ein part av hesum arbeiði inn aftur, til dømis ein part av sýninum av fiskiskipum.

- Men alt hetta setir stór krøv til sýnsdeildina og teirra førleikar, og frammanundan hava tey jú eftirlitið við øllum okkara fiskiflota, alibátum og so framvegis. Har gera vit eisini átøk fyri at betra um trygdina, millum annað kanna



Herluf Debes er datamatikari. Aðru hvørja viku arbeiðir hann á sýnsdeildini, og aðru hvørja viku fæst hann við vinnubrøv á manningardeildini.



Christel Christoffersen er deildarleiðari á umsitingar- og manningardeildini.



Hans Johannes á Brúgv hevur skrivstovu bæði á høvuðsskrivstovuni hjá Sjóvinnustýrinum í Vágum og á skrivstovuni hjá Skipaskrásetingini og FAS í Havn, og roynir at býta tíðina nøkulunda javnt millum báðar skrivstovurnar.

vit, um regluligar bjargingarroyndir verða gjørdar og um krøvini um trygdarútgerð verða hildin. Alt arbeiðið við fiskiflotanum fyllir sjálvsagt nógv bæði hjá eftirlitsfólkunum og á skrivstovuni, sigur stjórin.

**Nýggj talgildað mynstring ávegis**

Sjóvinnustýrið hevur eisini ábyrgdina av øllum mynstringunum í fiskiflotanum. Her er talan um tíðarkrevjandi arbeiði, men ætlanin er, at innan eitt ár verða allar ella nógv tær flestu mynstringarnar á fiskiskipunum sendar talgildaðar av skipinum til Sjóvinnustýrið. Nýggju elektronisku skipsdagbøkurnar, sum støðugt fleiri skip fáa sær, lata eisini upp fyri talgildaðu mynstringarlistunum.

Í Sjóvinnustýrinum leggja tey seg sum heild eftir skjótt at flyta seg inn í talgildaða heimin. Tað er sostatt langt síðani, at skipaskrásetingarnar vórðu talgildaðar og gjørdar alment framkomiligar á Teyggjuni – teyggjan.fo, og avgreiðslan av sjóvinnubrøvum verður eisini talgildað í næstum.

**2239 smábátar**

Høvuðsskrivstovan hjá Sjóvinnustýrinum liggur í Vágum, men Skipaskrásetingin, FAS og leiðsluskrivarin hjá stjóranum húsast tó í Havn.

Umframt dagliga skrásetingararbeiðið hevur Skipaskrásetingin síðani árskiftið 2014-2015 gjørt eitt risa arbeiði at skráseta allar teir føroysku smábátarnar. Eitt starvsfólk í tíðaravmarkaðum starvi var til fyri stuttum knýtt at Skipaskrásetingini fyri burturav at taka sær av smábáta-skrásetingini, umframt at tey bæði føstu starvsfólkini eisini hava lagt nógva orku í hetta arbeiðið.

Tilsamans 2239 smábátar undir fimm bruttotons eru nú skrásettir.

**Nýggj sjóvinnubrøv**

Í løtuni hevur serliga ein deild hjá Sjóvinnustýrinum meira enn vanligt um at vera. Tað er manningardeildin, sum tekur sær av øllum sjóvinnubrøvunum og skjølum annars hjá manningunum.

Orsøkin er, at vinnubrøv og førleikaprógv hjá øllum føroyskum sjófólkum skulu endurnýggjast innan 1. januar 2017

Stóri trupulleikin er at fáa fólk at fata, at freistin er meint í álvara, og at tað ikki ber til at mynstra eftir nýggjár við gomlu sjóvinnubrøvunum.

- Nú hava vit sett 1. september, sum endaliga freist at søkja um endurnýggjan av sjóvinnubrøvunum. Vónandi bíða ikki øll til tá, men um nógvar umsóknir koma eftir settu freistina, hava vit ongan kjans at avgreiða tær fyri nýggjár, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Næsta stóra broyting er, at umsøkjarin skal søkja talgildað á netinum, tá hann skal hava sjóvinnubræv. Sjóvinnustýrið hevur seinasta árið ment nýggja talgilda skipan saman við Formula.fo.

- Vit royndarkoyra skipanina nú, men arbeiðstrýstið er stórt í løtuni, og tí er ivasamt, um vit klára at seta skipanina endaliga í verk í ár, sigur Hans Johannes á Brúgv

**Flytirok**

Í øllum arbeiðsmeldrinum eru skrivstovurnar hjá Sjóvinnustýrinum bæði í Vágum og í Havn flutt í nýggj høli.

Skipaskrásetingin og FAS eru flutt av Skálatrøð og oman undir Bryggjubakka í Vágsbotni.

Sjóvinnustýrið hevur høvuðsskrivstovu í leigaðum bygningi í Miðvági í Vágum, men í vár noyddust tey at rýma haðani undan soppi. Meðan bygningurin í Miðvági verður umvældur, húsast høvuðsskrivstovan í øðrum hølum á ídnaðarøkinum omanfyri flogvøllin í Sørvági.




Um ikki so leingi fer at bera til at søkja talgildað á netinum um nýggj vinnubrøv. Vinnubrøvini verða úr plasti á stødd við gjaldskort.

tekstur og myndir: INGOLF S. OLSEN -*PRESS*



- Eg haldi, at FAS skapar eitt stórt potensjali fyri einari rúgvu av avleiddum virksemi í Føroyum innan øll sløg av sjóvinnu, vitanartungari eins væl og praktiskari. Tað snýr seg um at vilja tað og síðani avseta neyðugu orkuna til tað, sigur Hans Johannes á Brúgv, stjóri í FAS.

# FAS grundvøllur undir vitanarvinnu

**Vilja vit menna Føroyar til ein maritiman depil á øllum økjum innan sjóvinnu, so kann FAS verða snúningsásurin í tilgongdini. Men tað krevur vilja í vinnuni og í politisku skipanini, tí orkan er sera avmarkað, sum er. Tað sigur Hans Johannes á Brúgv, stjóri í FAS.**

Tá FAS, Føroya Altjóða Skipaskráseting, varð til í 1992, var tað í fyrsta lagi, tí politikararnir vóru bangnir fyri, at føroyska farmavinnan fór at hvørva, tí skipini fóru at leita sær undir fremmant flagg í londum, sum lokkaðu við ymiskum fyrimunum í teirra altjóða skipaskrásetingum.

Soleiðis er ikki longur, væntaninar og vónirnar um, at FAS fer at kasta nógv meira av sær til samfelagið eru stórar, men fleiri fýlast á, at tað gongur ov seint, og at ov lítið sæst eftir.

Hans Johannes á Brúgv, stjóri í FAS, skilir atfinningarnar.

- Eg haldi, at FAS skapar eitt stórt potensjali fyri einari rúgvu av avleiddum virksemi í Føroyum innan øll sløg av sjóvinnu, vitanartungari eins væl og praktiskari. Tað snýr seg um at vilja tað og síðani avseta neyðugu orkuna til tað, sigur hann.

### Tað krevur tol

Harvið sipar hann eisini til, at sum er, hevur FAS ikki orku til serliga nógv. FAS er fíggjað við 228.000 krónum á fíggjarlógini og egnum inntøkum frá nýskrásetingargjøldum og ársgjøldum. Við teimum 89 skipunum, sum í løtuni eru skrásett í FAS, liggja árligu inntøkurnar frá gjøldum um hálva triðju millión krónur, harav meginparturin fer til skipaeftirlitspartin.

- Eg dyrgi ikki eftir, at vit bara skulu hava eina rúgvu av pengum til rakstur. Men tað er greitt, at vilja vit hava, at FAS skal verða ryggurin í einari menning av fleiri sjóvinnum, so krevur tað bæði fólk og pengar til marknaðarføring.

- Men í altjóða sjóvinnu snýr tað seg um langtíðar marknaðarføring. Tingini taka tíð, og tað kostar, áðrenn skipini koma. So tað krevur tol. Vit hava havt FAS síðani 1992, men tað er ikki fyrr enn seinastu árini, síðani FAS-lógin varð broytt í 2008, at skrásetingin veruliga hevur tikið dyk á seg, sigur FAS-stjórin.

Tá vóru umleið 30 skip í FAS, og nú átta ár seinni eru tey 89.

- Tað ljóðar kanska ikki so ógvusligt, men 89 skip í einari føroyskari altjóða skipaskráseting er ikki so lítið, um hugsað verður um, at talið av fiskiskipum omanfyri 20 tons er beint omanfyri 120. Men eg má tó viðganga, at enn er langt upp til tey 200 FAS-skrásettu skipini, sum eg, tá eg gjørdist stjóri 1. januar í 2013 hevði sum mál at røkka í 2018. Tað er helst órealistiskt at vænta, at vit klára tað, men gongdin er rætta vegin, sigur Hans Johannes á Brúgv.

### Høgt støði

Poul Michelsen, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum, hevur sett sjøtil á arbeiðið at menna Føroyar til ein altjóða maritiman depil. Tað er gjørt við í fyrstu syftu at seta ein arbeiðsbólk at orða eina maritima strategi og ein maritiman politikk fyri Føroyar.

Hans Johannes á Brúgv er sjálvur við í hesum arbeiðsbólkinum.

- Tað snýr seg um marknaðarføring og aftur marknaðarføring, samstundis sum vit alla tíðina tryggja okkum at vera dagførd her heima við greiðum skipanum og mannagongdum. Vit eru við í altjóða sjóvinnufelagsskapinum IMO og lúka krøvini í eitt nú sáttmálanum um trygd, SOLAS.

### Vit eru lítil og ókend

Í aðrari grein her í blaðnum finst Gunnbjørn Joensen, skipaumboðsmaður, annars júst at, at Føroyar hava lagt seg eftir høgu norðurlendsku standardunum, tí tað hevur elvt til óneyðuga og óhepna kapping við okkara grannar. Hann heldur, at vit heldur áttu at havt lagt okkum eftir at draga stór reiðarí til okkum úr øðrum pørtum av heiminum.

Stjórin í FAS er ikki samdur í hesum.

- Eg skilji væl logikkin, og tað hevði kanska spart okkurt FAS-skip fyri trupulleikar í grannalondunum, um vit frá byrjan løgdu kappingina onkra aðrastaðni. Men vit eru eitt øgiliga lítið land, eisini í sjóvinnuhøpi, og tá FAS varð sett á stovn vóru vit fullkomiliga ókend. Tí máttu vit sjálvsagt fyrst royna at fáa skip úr londum, sum høvdu ein kjans at vita, hvørji vit vóru, at skráseta seg her, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Í dag hava øll FAS-skipini norðurlendskan uppruna, men stjórin er nú eisini farin at hyggja longur út í Evropa fyri har at marknaðarføra FAS og Føroyar sum sjóvinnuland.

### Sjarmuferð í Grikkalandi

Fyrst í juni var hann saman við Guðruni Øster, leiðsluskrivara, vegna FAS á stóru maritimu messuni Posidonia í Athen í Grikkalandi, og eisini har fekk hann váttað, hvussu stóran týdning effektiv marknaðarføring hevur.

- Í 1992 visti ongin um okkum, og tað er enn so, at Føroyar og FAS eru rættiliga ókend í altjóða sjóvinnuni, og hóast Posidonia er ein messa fyri professionellar maritimar aktørar við luttøku úr øllum heiminum, so vóru nógv har, sum als onki vistu um okkum. Men fleiri fingu áhuga og vendu sær til okkum fyri at hoyra meira.



Guðrun Øster, leiðsluskrivari, var við stjóranum á messuni Posidonia í Athen.

- Í nógvum flaggstatum er altjóða skipaskrásetingin fullkomiliga kommersialiserað og privatiserað. Hon er einfalt latin upp í hendurnar á privatum fyritøkum, sum ofta ikki eingongd hava heimstað í flaggstatinum, hvørs áhugamál tær røkja. Fleiri av teimum, sum komu til okkum á Posidonia, søgdu, at tað var júst ein skráseting sum FAS, tey longdust eftir at síggja, tí hon er forankrað í einum almennum stovni í einum vælskipaðum, lítlum landi, har tað er stuttur vegur millum vinnu og myndugleikar, sigur Hans Johannes á Brúgv.

### Stórur grikskur áhugi

Hann hevði onga ítøkiliga nýggja skipaskráseting heim við sær aftur úr Grikkalandi, men hevur tó góðar vónir um, at okkurt fer at vísa seg seinni.




Leingi lá talið á FAS-skipum støðugt á umleið 30, men við lógarbroytingini í 2008, tá skattaafturberingin varð økt úr 30 í 35 prosent, tóku skrásetingarnar dik á seg, og nú eru 89 skip skrásett í FAS.

- Áhugin var stórur, og okkurt um 100 fólk, flest umboð fyri reiðarí, fingu faldaran um FAS, sum vit høvdu við okkum. Og tá skal sigast, at vit stóðu ikki bara á einum horni og býttu út – tey, sum fingu faldaran, vóru fólk, sum komu til okkum av áhuga og fyri at fáa meira at vita.

- Nógv stór altjóða reiðarí eru í Grikkalandi, og vónandi spyrst onkur skráseting burtur úr luttøkuni á Posidonia. Um bara eitt grikst skip letur seg skráseta í Føroyum, so er tað eitt gott úrslit. Tí tað fer at vísa hinum, hvat FAS og Føroyar eru, og eru royndirnar góðar, fara fleiri at koma. Soleiðis var eisini við Svøríki, tað byrjaði í smáum, men seinast fingu vit fleiri skip í einum, tí nú kenna tey okkum, sigur Hans Johannes á Brúgv.

### Altjóða maritimur depil

FAS-stjórin heldur útlitini vera góð fyri, at Føroyar kunnu menna seg til ein altjóða maritiman depil, soleiðis sum uttanríkis- og vinnumálaráðharrin hevur stungið út í kortið.

- Um vit veruliga vilja tað og bera okkum rætt at, so er nærum onki mark fyri, hvat vit kunnu lyfta, og sum stjóri í FAS vil eg fegin fortelja bæði heima og úti um ta ørgrynnu av sjóvinnumøguleikum, sum vit hava. Vit hava eina rúgvu av møguligum aktørum og ambassadørum, eitt nú ein hóp av siglandi fólki við sera góðum kompetansum. Fleiri teirra kundu hugsa sær at farið í holtur við aðra sjóvinnu eitt nú innan shipping og management. Men enn er ov lítið sjóvinnuvirksemi í Føroyum at koma heim eftir.

- Í 2008 tóku vit fyrsta stigið at brúka FAS sum lokomotiv í menningini av okkara sjóvinnu. Tað var, tá lógin varð broytt. Men tað eru tey fyrstu stigini, sum eru tey tyngstu, og enn er spunni tráðurin tunnur. Kynstrið er at fáa hann til eina tjúkka flættu, sigur Hans Johannes á Brúgv.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



- Eg eri sera tilvitaður um, at eg havi tveir ymiskar kasjettar á høvdinum. Tí havi eg heldur onki við manningarásetingarnar at gera í Sjóvinnustýrinum, eins og sýnsdeildin har onki hevur við FAS at gera, sigur Hans Johannes á Brúgv.

# Tveir kasjettar

**Formenninir í yvirmannafeløgunum halda tað vera sera óheppið, at stjórin í FAS og stjórin fyri Skipaeftirlitinum er ein og sami persónur, tí hann verður noyddur at røkja mótstríðandi áhugamál. Skipaumboðsmaður sær bæði fyrimunir og vansar við dupultleiklutinum.**

Hans Johannes á Brúgv er ein týðandi aktørur í føroysku sjóvinnuni, bæði tí heimligu og altjóða partinum av henni.

Hann er nevniliga bæði stjóri fyri Skipaeftirlitinum og fyri Føroya Altjóða Skipaskráseting, FAS.

Men tað eru verri enn so øll í sjóvinnuni, sum halda tað vera skilagott, at hann skal bera hesar báðar kasjettarnar í senn.

**Óheppið**

Bæði Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, og Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, eru avgjørdir í málinum. Teir halda, at eftirlitsparturin í Sjóvinnustýrinum og FAS skulu hava hvør sín stjóra.

- Eg haldi tað vera sera óheppið, at stjórin í FAS og í Skipaeftirlitinum er sami persónur, og hesar leiðslurnar eiga at verða skildar sundur, tí áhugamálini eru ikki tey somu, men peika tvørturímóti hvør sín veg.

- Sjóvinnustýrið skal jú ganga á odda, tá tað kemur til trygd og at halda altjóða reglur viðvíkjandi skipum og manningum. Hinvegin hevur FAS áhuga í fáa fleiri skip skrásett, tað er at selja eina vøru uttan ov nógvar forðingar. Stjórin kann tískil skjótt koma undir trýst frá einum útlendskum reiðara ella umboðsmanni, sigur Páll Hansen.

**Báðumegin borðið**

Annfinnur Garðalíð samdur.

- Tað er ikki í lagi, at stjórin fyri hasar báðar funksjónirnar er sami persónur, tí áhugamálini eru so ymisk. Hann skal jú umboða bæði útinnandi og lóggevandi valdið. Sum stjóri í Skipaeftirlitinum skal hann væntast at umboða ein passaliga strangan eftirlitsmyndugleika og umsita tær lógir og reglur, sum føroyska sjóvinnan virkar eftir. Sum FAS-stjóri skal hann hinvegin vera tann smidligi stjórin, sum skal gera reiðararnar nøgdar og kanska ofta royna at fáa undantak frá teim somu reglunum, hann umsitur sum stjóri í Sjóvinnustýrinum, heldur hann.

**Fyrimunir og vansar**

Gunnbjørn Joensen, sum er ein umboðsmaður fyri útlendsk reiðarí í Føroyum, heldur eisini, at tað í ávísum førum kann vera problematiskt við teimum báðum kasjettunum hjá Hans Johannes á Brúgv, men hann heldur tað eisini hava nógvar fyrimunir.

- Tað er greitt, at tað verður meira smidligt við viðgerðini í FAS og Skipaeftirlitinum, tá leiðslan er tann sama á báðum stovnunum, sum eisini í tí dagliga eru nógv tengdir at hvørjum øðrum. Tað problematiska liggur serliga í FAS-partinum og altjóða umdøminum hjá FAS, tí fyri at røkja áhugamálini har, verður hann noyddur at vera meira tænastuhugaður enn strangi eftirlitsmaðurin, hann skal vera í stjórasessinum hjá Sjóvinnustýrinum, sigur hann.





Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, og Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, halda dupultleiklutin hjá Hans Johannesi á Brúgv vera ivasaman. Gunnbjørn Joensen, skipaumboðsmaður, sær bæði fyrimunir og vansar við, at stjórin hevur tveir kasjettar.

**Fleiri fyrimunir**

Sjálvur skilir Hans Johannes á Brúgv væl, at onkur er atfinningarsamur, tí tað kann tykjast sum, at andsøgn er ímillum áhugamálini hjá teimum báðum almennu stovnunum.

Kortini heldur hann, at fyrimunirnir við at vera stjóri í bæði Skipaeftirlitinum og FAS eru væl størri enn vansarnir.

- Onkur heldur, at tað er problematiskt, at eg eri stjóri í báðum stovnum, og eg skilji atfinningarnar. Men hinvegin er tað eitt ynski, at vit skulu menna og víðka um okkara sjóvinnu. Í so máta er alneyðugt við synergium millum allar aktørar, ikki minni millum FAS og Sjóvinnustýrið, og tá er tað ein stórur fyrimunur, at báðir stovnarnir hava sama stjóra. Men um vit hugsa um armslongd, so hevði tað kanska verið ynskiligt, at ein deildarstjóri var undir mær at hava dagliga arbeiðið við FAS, sigur Hans Johannes á Brúgv.

**Tilvitaður um kasjettar**

- Eg eri sera tilvitaður um, at havi tveir ymiskar kasjettar á høvdinum. Tí havi eg heldur onki við manningaráseting-arnar at gera í Sjóvinnustýrinum, eins og Skipaeftirlitið har onki hevur við FAS at gera. Viðvíkjandi undantøkunum, til dømis tá tað snýr seg um manningarskjølini, sum onkur hevur so ilt av, og sum verða sett í samband við mína dupultfunksjón, so kann eg bara vísa á hagtølini, sum vísa, at talið av undantaksloyvum av hesum slagnum eru minkað við einari helvt hesi seinastu tvey-trý árini.

- Annars kann argumentasjónin við teimum mótstríðandi áhugamálunum væl vendast á høvdið. Tí vit mugu ikki gloyma, at tað er høga støðið í FAS, sum er vørumerkið, tá vit royna at fáa nýggj skip skrásett. So tað hevur eisini avgerandi týdning fyri FAS, at Skipaeftirlitið undir Sjóvinnustýrinum virkar væl og óheft, sigur hann.




Undantøkini í manningarskjølum eru nærum farin niður í helvt síðani 2012.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*

Gunnbjørn Joensen hevur nógv hugskot um, hvussu sjóvinnan kann mennast, uttan at tað skal kosta so nógv. Millum annað heldur hann, at vit væl kunnu gera PSC (Port of State Control)-eftirlit við skipum í føroyskum havnum uttan at vera limur í Paris Mou.

- Skipaeftirlitið hevur ikki fólk til tað, men tað kundi verið gjørt í samstarvi við Vinnuháskúlan, so navigatørlesandi gjørdu eftirlitið. Tað vildi eisini verið hollur lærdómur hjá teimum at fingið við í skjáttuna, heldur Gunnbjørn Joensen.



# Skipaumboðsmaður:
# FAS kappast við skeiv lond

**FAS skuldi frá byrjan av lagt seg eftir at draga reiðaríir til sín frá meira fjarskotnum londum enn norðurlendsku grannatjóðunum, sigur Gunnbjørn Joensen, sum eisini heldur skattaafturberingina til bareboat-leigað skip vera betri enn sjálvt FAS.**

Nógvir møguleikar liggja opnir fyri einari blómandi sjóvinnu í Føroyum, og tað er umráðandi, at vit fáa sum mest burtur úr okkara FAS-skipan, nú vit hava hana. Men flaggið er ikki tann týdningarmesta fortreytin fyri, at sjóvinnan kann menna seg.

Tað heldur Gunnbjørn Joensen, skipaumboðsmaður, fyrrverandi reiðari hjá Thor í Hósvík, har hann enn er ein av stóru eigarunum.

Fyritøkan hjá honum, sp/f 7 Holding, fæst við ymiskt, og arbeiðir hann millum annað fyr svenska Svitzer. Reiðaríið hevur 11 skip skrásett í Føroyum, og verður alt bókhaldið og kontraktumsitingin hjá FAS-skrásettu skipunum hjá felagnum gjørt her.

- Nú eru hesi skipini í FAS, men vit kundu eins væl gjørt hetta arbeiðið, sjálvt um skipini vóru undir øðrum flaggi, sigur Gunnbjørn Joensen.

**Skeivt fokus**

Hann heldur, at føroyska sjóvinnan mennir seg ov seint, og at vit hava ov nógvar trupulleikar av flagginum, tí vit frá fyrstan tíð, tá FAS varð stovnað, høvdu skeivt fokus og løgdu okkum eftir at fáa skip úr hinum Norðurlondunum undir føroyskt flagg.

- At fara inn í garðin hjá grannanum at heysta, tað er at biðja um trupulleikar. Vit skulu heldur lagt okkum eftir reiðaríum longri burturi. Kanska í londum, har støðið frammanundan ikki var so høgt, tí tá kundu vit lyft støðið har og fingið kreditt fyri tað, í staðin fyri sum nú, har ITF eftir kravi frá hinum Norðurlondunum hevur skrásett føroyska flaggið sum hentleikaflagg, sigur Gunnbjørn Joensen.

Hann heldur, at FAS hevur lagt seg eftir so høgum standardum júst fyri at kappast við hini Norðurlondini.





Svenska reiðaríið Svitzer, sum Gunnbjørn Joensen er umboðsmaður fyri, hevur 11 skip skrásett í Føroyum.

- Vit eiga at leggja okkara støði eftir IMO-krøvunum, hvørki meira ella minni. Men myndugleikarnir her heima leggja støðið hægri og tulka alt nógv strangari, enn neyðugt er. Vit hava trupulleikar við ITF í løtuni, men tað hevur jú onki við standin á skipunum at gera, so teir trupulleikarnar høvdu vit havt kortini, sigur Gunnbjørn Joensen.

**Reka skip burtur**

Hann sigur, at stranga føroyska tulkingin av reglunum fyri klassifisering var eisini beinleiðis orsøkin til, at tey nýggjastu frálandaskipini hjá Thor vórðu skrásett á Bahamas.

- Sjóvinnustýrið stóð fast um at klassifisera tey sum ferðamannaskip, tí tey primert verða brúkt at flyta fólk í oljuvinnuni. Men hesi fólkini eru ikki vanlig ferðafólk. Tey eru professionell oljuvinnufólk, sum hava øll hugsandi sertifikatir innan trygd og bjarging, so krøvini hjá Sjóvinnustýrinum vóru burturvið. Tað er spell, tí hesi skipini kundu tað sama verið skrásett í FAS.

- Tí vil eg siga, at skulu vit hava FAS og fáa skip at skráseta seg har, so mugu tey hava ein meira positivan hugburð, so tey ikki reka okkara egnu burtur. Mínar royndir eru, at hugburðurin er positivur, tá tað snýr seg um útlendsk reiðarí, men meira illgrunasamur, tá tað snýr seg um føroysk reiðarí, sigur Gunnbjørn Joensen.

**Rós til skatta-FAS**

Stóð tað til hann, so varð meira gjørt við at marknaðarføra skattaafturberingina til bareboat-leigað skip, altso skatta-FAS.

- Vit kundu fyri tað bara havt ta skipanina, tí hon kundi kasta eins nógv avleitt virksemi og tryggar inntøkur av sær og FAS, og vit høvdu sloppið undan øllum flagg-trupulleikunum, sigur Gunnbjørn Joensen og leggur afturat:

- Í Thor byrjaðu vit í smáum og við lítið av pengum. Tey fyrstu frálandaskipini luku ikki treytirnar fyri skráseting í FAS, so tey vóru skatta-FAS-skip, og var ongin annar møguleiki fyri skattaafturbering, so høvdu vit ongantíð sloppið í gongd í frálandavinnuni, staðfestir hann.

Gunnbjørn Joensen vísir á, at tað ikki vóru IMO og trygdarkrøv, sum gjørdu, at tey fyrstu skipini ikki luku treytirnar fyri skráseting í FAS, men føroyskar serreglur, til dømis reglur um hæddir millum dyrk og loft.

Gunnbjørn Joensen var til fyri stuttum partur av leiðsluni hjá Thor í Hósvík, sum eigur og rekur bæði fiskiskip og frálandaskip. Hann er enn ein av stóru eigarunum í Thor, har hann eisini situr í nevndini. Men hann annars hevur hann tikið seg úr virkseminum hjá reiðaríinum og arbeiðir nú umvegis felagið 7 Holding sum sjálvstøðugur skipaumboðsmaður.



Jákup K. Poulsen, leiðari á Skipaeftirlitinum: - Vit fylgja IMO- og ILO-ásetingunum.

# Skipaeftirlitið vísir atfinningum aftur

Jákup K. Poulsen, leiðari á Skipaeftirlitinum – sýnsdeildini – undir Sjóvinnustýrinum undrast um atfinningarnar hjá Gunnbjørn Joensen.

- IMO arbeiðir ikki við fleiri sløgum av ferðafólki, annaðhvørt er tú ferðafólk, ella ert tú tað ikki. IMO arbeiðir tó í løtuni við at gera ein nýggjan bólk – ella hutak – av fólki sum kallast "industrial persons", ið júst er ætlaður til tað slagi av fólki, sum skipini hjá Thor flyta millum land og seismikkskip. Sjóvinnustýrið fer sjálvandi at brúka hesar reglur, tá tær koma.

- Og viðvíkjandi hæddum millum dyrk og loft, so er ikki talan um føroyskar serreglur, men um minimumskrøv, sum ILO setur. Minimum hevur í mong ár veri 198 sentimetrar, men nú í 2013 bleiv hettar broytt til 203 sentimetrar, hettar er tó bert galdandi fyri nýggj skip, sigur Jákup K. Poulsen.

Hans Johannes á Brúgv, stjóri í Sjóvinnustýrinum vísir eisini staðiliga aftur, at Sjóvinnustýrið ger mun á føroyskum og útlendskum reiðaríum.

tekstur og mynd: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



- Vit hava í dag fleiri umboðsmenn enn reiðarar í Føroyum umboðandi FAS-skipini, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

# Umboðsmenn taka yvir

## Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum sær stórar møguleikar í FAS og at fáa økt virksemið innan sjóvinnu í Føroyum. Men so má okkurt munagott gerast fyri at fáa veruliga virksemið hendavegin og ikki bert umboðsmenn, heldur hann.

Nógvir umboðsmenn, men ov lítið ítøkiligt virksemi.

Soleiðis tekur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, saman um føroysku sjóvinnuna nú skjótt 25 ár eftir, at Føroya Altjóða Skipaskráseting, FAS, kom í eyga.

Hann umboðar manningarfeløgini í arbeiðsbólkinum, sum landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum hevur sett at orða eina maritima strategi og ein maritiman politikk fyri Føroyar.

- FAS eigur at kasta nógv meira av sær av virksemi og arbeiðsplássum bæði á sjógvi og landi. Bara at hava eina rúgvu av skipum standandi á einum lista og við føroyskum flaggi á hekkuni er ikki í sær sjálvum til stóra nyttu. Til dømis eru nógv svensk skip í FAS, men ongir føroyskir yvirmenn sigla við teimum, sjálvt um tað eru vit, sum hava sáttmála við tey. Hetta er ikki nakað gott signal at senda.

- Hví so er, tað veit ikki, men tað er greitt, at vit kunnu gera nógv meira fyri at fáa meira lønandi virksemi burtur úr FAS, sigur Páll Hansen.

### Vilji og dugnasemi

Í aðrari grein ("FMU um hentleikaflaggið: Bólturin liggur hjá myndugleikunum") her á síðunum vísir hann eisini á, at júst nógv umboðsmannavirksemið í sambandi við FAS-skip og ofta fløkta myndin av verðuliga eigaraskapinum er ein av høvuðsorsøkunum til, at føroyska flaggið av ITF er sett í bás sum hentleikaflagg.

- Tað sjóvinnupolitiska málið við FAS var annars at forða fyri, at føroyska farmavinnan fór fyri skeytið, tá danir fingu DIS, og at føroyskir reiðarar og føroyingar annars, sum hava virksemi og áhuga í sjóvinnu, skulu á heimskortið. Tað er ikki heilt eydnast, men eg rokni við, at vit sagtans kunnu fáa tað at eydnast, um vilji og dugnasemi er til tess.

- Vit hava í dag fleiri umboðsmenn enn reiðarar í sambandi við FAS, og tað átti at givið Vinnuhúsinum, sum eisini Reiðarafelagið fyri Farmaskip er partur av, okkurt at hugsa um, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.

### Altjóða maritimur depil

Arbeiðið í arbeiðsbólkinum at orða eina maritima strategi og ein maritiman politikk fyri Føroyar, gongur spakuliga, heldur Páll Hansen, og tað eru nógvir knútar sum skulu loysast á vegnum fram ímóti Føroyum sum ein altjóða maritimur depil.

- Tað verður trupult at vaksa um avleiddar vinnur, tá veruligi eigarin húsast onkustaðni uttanlands við síni høvuðsskrivstovu, viðlíkahaldsdeildum og avtalum við tænastuveitarar har. Vit mugu onkursvegna bera so í bandi, at FAS-reiðaríini eisini fáa áhuga at flyta alt tað virksemið til Føroya, og eg kenni meg sannførdan um, at skulu vit vaksa munandi um maritima virksemið í Føroyum næstu árini, so er tað ikki við fleiri umboðsmonnum, men í fyrsta lagi við reiðarum, sum eru føroyingar, og við aktivt at stuðla fólki, sum hava hug at reka maritimt virksemi í Føroyum og syrgja fyri, at karmarnir fyri tí eru best møguligir, sigur Páll Hansen.

### Líta á egnan mátt

Verður farið fram eftir tí leistinum, ivast hann ikki í, at FAS kann gerast ein stórleverandørur av avleiddum virksemi.

- Tað vil bæði økja um eftirspurningin eftir fólki við maritimum úrbúgvingum, sum vit jú hava hópin av, og vaksa um maritima virksemi í Føroyum. Vit mugu tora at sanna gamla orðið, at best er at líta á egnan mátt og megi, sigur Páll Hansen.

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum leggur dent á, at føroyska FAS-lógin bæði skal tryggja eitt høgt støði á føroyskt skrásettum skipum, samstundis sum at skattalógin og aðrar lógir, ið sjóvinnan virkar undir, tryggja greiðar karmar, gjøgnumskygni og opið spæl mótvegis útandinum og serliga teimum londunum, har FAS-skipini hava sín uppruna.

Hetta fyri at tryggja, at føroysk sjóvinna stendur væl í ljósinum allastaðir og ikki endar á svartalista hjá til dømis ITF, har føroyska flaggið er skrásett sum hentleikaflagg.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



Petur Alberg Lamhauge, fyrrverandi aðalstjóri í Fíggjarmálaráðnum og fyrrverandi stjóri á Líkningarráð Føroya (seinni fyrst Toll og Skatt og síðani Taks), er farin á eftirløn, men hann er framvegis knýttur at Fíggjarmálaráðnum sum ráðgevi.

## Fyrrverandi skattastjóri:

# Skatta-FAS er ein óheppin skipan

**Skattalógin letur upp fyri, at leigað skip, sum ikki eru skrásett í FAS, fáa somu skattasømdir sum FAS-skip. Hetta eigur at broytast, heldur Petur Alberg Lamhauge, sum á sinni var ein av arkitektunum aftanfyri FAS og broytingunum í skattalógini í tí sambandinum.**

Petur Alberg Lamhauge, fyrrverandi aðalstjóri í Fíggjarmálaráðnum, er ein av teimum, ið veit mest um FAS og tilhoyrandi ásetingar í skattalógini. Hann var stjóri í Líkningarráð Føroya, sum skatta-parturin av núverandi Taks æt, tá FAS varð til, og hann var eisini ein av arkitektunum aftanfyri skattatekniska partin av skipanini.

Hann minnist tó ikki heilt, hvørjar politisku grundgevingarnar vóru fyri at geva skipum uttanfyri FAS at kalla somu sømdir sum skipunum innanfyri. Í viðmerkingunum til FAS-lógina og tilhoyrandi skattalógarbroytingar stendur heldur onki um hetta.

- Tað er ikki óhugsandi, at tað hevur verið eitt ynski í vinnuni um eina lagaliga skipan í einari skiftistíð, sum politikararnir hava lurtað eftir. Men hetta hevur so verið óbroytt síðani, sigur Petur Alberg Lamhauge.

Hann er við í arbeiðsbólkinum, sum Poul Michelsen, uttanríkis- og vinnumálaráðharri, hevur sett at orða eina maritima strategi og ein maritiman politikk fyri Føroyar.

Í arbeiðsbólkinum eru tey í holtur við at gera eina greining av FAS og skattligu viðurskiftunum hjá teimum bareboat-leigaðu skipunum, tað eru skatta-FAS-skipini. Greiningin skal verða liðug í summar, og arbeiðsbólkurin skal koma við sínum áliti til landsstýrismannin í heyst.

### Tíðin farin frá skatta-FAS

Hóast hann er varin við at gera avgjørdar niðurstøður, áðrenn greiningin er liðug, so heldur Petur Alberg Lamhauge, at tíðin er farin frá hesi serskipanini, sum skatta-FAS er.
- Tað snýr seg um, at bareboat-leigað skip verða skattliga javnsett við FAS-

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** -*PRESS*

skip. Eg skilji væl tey, sum finnast at einari slíkari skipan, og eg haldi, at um ætlanin er at gera tað smidligari hjá til dømis nýggjum reiðaríum, so eigur at bera til at gera tað innanfyri FAS-skipanina.

- Um skattaafturberingin til bareboat-leigað skip ger, at okkurt føroyskt reiðarí kann fáa fótin fyri seg, so er tað sjálvsagt positivt. Men um prísurin er eitt vánaligt umdømi og fyrimunir fram um skip, sum er skrásett í FAS, so er tað negativt. Eg haldi, at um man vil geva reint føroyskt baseraðum reiðaríum eitt skotbrá í mun til at liva upp til krøvini í FAS, so kundi man hugt at tí innanfyri sjálva FAS-skipanina. Men so er tað spurningurin, um man kann loyva sær at gera mun á føroyskum og útlendskum reiðaríum í FAS, sigur Petur Alberg Lamhauge.

**Stovnaðu FAS av neyð**

Fyrrverandi skattastjórin vísir á, at tað í fyrsta lagi var av neyð, at lunnar vórðu lagdir undir FAS fyrst í 1990-árunum, og at tað tá helst var avmarkað, hvussu stórar væntanirnar vóru um, at skipanin skuldi verða grundarlag undir einari vaksandi føroyskari sjóvinnu, sum í seinasta enda kanska skuldi gera Føroyar til ein maritiman depil í Norðuratlantshavi.

Stutt frammanundan hevði Danmark, har nógv teir flestu føroysku útisiglararnir høvdu hýru, sett á stovn teirra altjóða skipaskráseting, DIS.

Í DIS rinda manningarnar ikki skatt, men fáa í staðin eina lága nettohýru. Á tann hátt fáa reiðaríini óbeinleiðis tann skattin, sum manningarnar skuldu havt goldið, um tær vórðu skattaðar sum aðrir løntakarar.

Hetta skapti órógv hjá føroysku skattamyndugleikunum og føroysku politikarunum, tí áðrenn DIS var skatturin hjá føroysku útisiglarunum í danska handilsflotanum endaður í Føroyum umvegis táverandi sjómansskattaskipanina. Hon gekk í stuttum út upp á, at føroysku sjómenninir vóru skattskyldugir í Danmark, sum eisini tók skattin inn, men síðani flutti hann til Føroya.

Men við DIS var ongin skattur at heinta inn, so Føroyar stóðu til at missa umleið 12 milliónir krónur um árið í tátíðar pengum.

Føroyar mótmæltu tó, at føroyski sjómansskatturin nú fór til at stuðla donsku reiðaríunum heldur enn í føroyska landskassan og kommunukassarnar. Tað fyrsta árið við DIS eftirlíkaðu donsku myndugleikarnir føroyska kravinum og sendu pengar til Føroya svarandi til ta upphædd, føroysku útisiglararnir tað árið skuldu havt goldið í skatt, um teir vórðu skattaðir eftir gomlu skipanini.

**Útisiglarar í skattaklemmu**

Men síðani varð lok lagt á danska pengakassan, og Føroyar máttu klára seg uttan danska sjómansskattin.

- Tað vóru sostatt tvær meginorsøkir til, at føroysku politikararnir kendu seg noyddar at fremja eina veruliga nýskipan. Onnur var, at skattaskipanin mátti broytast, tí tá sjómansskattaskipanin datt burtur við DIS, skuldu føroysku útisiglararnir í danska handilsflotanum, sum høvdu bústað í Føroyum, av røttum rinda skatt í Føroyum av donsku nettolønini. Onkur helt, at tað skuldu vit bara gera, men tey flestu hildu, at tað kundi ikki koma upp á tal. Sannlíkt hevði tað eisini rikið flestu útisiglararnar av landinum.

- Hin meginorsøkin var óttin fyri, at øll tey føroysku handilsskipareiðaríini fóru at flagga út til lond, sum høvdu DIS-líknandi skipanir, fyri tann vegin at fáa stórar skattligar fyrimunir, sigur Petur Alberg Lamhauge.

**Visjón um fleiri skip**

Hann leggur tó dent á, at tó at FAS at byrja við meira var eitt fyribyrgjandi átak enn eitt vinnufremjandi átak, so var tað frá degi eitt lagt inn í lógina, at man fegin vildi hava fleiri skip inn, eisini útlendsk, so skipanin kundi gerast grundarlag undir einari inntøkuvinnu. Men hóast tað javnan var uppi og vendi í politisku skipanini, at nú skuldi ferð setast á tann partin, so var tað ikki fyrr enn við umfatandi broytingini av FAS-lógini í 2008, tá skattaafturberingin var økt úr 30 í tey núverandi 35 prosentini av hýrunum, at útlendsku skrásetingarnar av álvara tóku dik á seg. Samstundis var serskipan gjørd fyri manningarnar við FAS-skipunum, sum higartil høvdu rinda vanligan skatt, soleiðis at hvørt einstakt sjófólk nú skuldi rinda ein bruttoskatt á 35 prosent, sama hvør inntøkan var.

**Tríggjar súlur**

Petur Alberg Lamhauge setir føroysku sjóvinnuna – uttan fiskivinnuna – upp sum tríggjar súlur. Tann fyrsta er tey føroysku reiðaríini, sum eru skrásett í FAS. Onnur súlan er útlendsku skipini í FAS. Og triðja súlan er Bareboat-leigað skip, sum fáa skattaafturbering – skatta-FAS-skipini.

- Við tí fyrstu súluni var málið jú at gera eina smidliga og kappingarføra skipan við góðum og tryggum kørmum fyri føroysk reiðarí og tess manningar. Her meini eg við reiðarí, ið hava høvuðssæti í Føroyum, har tey reka sítt reiðaravirksemi frá. Tað haldi eg var sera týdningarmikið at fáa gjørt, og eg haldi eisini, at hesin parturin hevur eydnast hampuliga væl.

- Næsta súlan snúið seg um at fáa útlendsk skip at skráseta seg her fyri at kunna økja um okkara sjóvinnuvirksemi og skapa nýggjar, avleiddar inntøkuvinnur. Tað er í lagi, og við nøkrum tillagingum á vegnum er áhugin at skráset seg í FAS øktur munandi. Nú fer okkara greiningararbeiði at vísa okkum, hvat hesi skipini veruliga leggja eftir seg, men eg eri rættiliga vísur í, at tey leggja alt ov lítið av virksemi eftir seg í Føroyum.

- Seinasta súlan eru tey útlendskt skrásettu, bareboat-leigaðu skipini. Har liggur enn minni eftir, men tað, ið kanska er verri, um vit hugsa um okkara altjóða umdømi, er, at hesi skipini ikki eru undir eftirliti av nøkrum føroyskum skipsmyndugleika. Tað haldi eg vera sera, sera óheppið, sigur hann.

**SKATTA-FAS:**

Tað er grein 2 í skattalógini, sum skattliga javnsetir bareboat-leigað skip - skatta-FAS-skip - við skipini í FAS. Greinin ásetir, hvør hevur avmarkaða skattskyldu í Føroyum, og javnsetingin hendir í hesum brotinum í greinini:

"Skip, tó ikki fiskiskip, sum eru skrásett við heimstaði í Danmark, Grønlandi ella øðrum landi, verða javnmett við skip, sum eru skrásett við heimstaði í Føroyum, um tey við ongari manning verða leigað av føroyskum reiðaravirki."





Formenninir í yvirmannafeløgunum halda lítið um sonevnda skatta-FAS.
- Skatta-FAS er ein snúltaraskipan, sigur Annfinnur Garðalíð.
- Tað líkist ongum, at summi kunnu sleppa undan at fylgja reglunum fyri føroyskt skrásett skip, sigur Páll Hansen.

# Skatta-FAS skýrt at vera snúltari

**Tað líkist ongum, at skip uttanfyri FAS kunnu fáa somu sømdir og skattafyrimunir sum skipini í FAS, men uttan at vera undir føroyskum skipaeftirliti, halda formenninir í yvirmannafeløgunum. Skipaumboðsmaður verjir tó skipanina.**

Høvuðsmálið hjá reiðaríunum – bæði teimum útlendsku og teimum føroysku – ið lata seg skráseta í Føroya Altjóða Skipaskrá, FAS, er skattaafturberingin.

Tað var tað eisini í 1992, tá FAS varð til, og politiska grundgevingin fyri at smíða FAS-lógina og gera tilhoyrandi broytingarnar í skattalógini, var, at onnur lond, sum føroysk sjóvinna kappast við, høvdu fingið sær líknandi skipanir. Politikararnir vóru einfalt bangnir fyri, at allur tann føroyski farmaflotin fór at flagga út til Danmark ella onnur lond, sum høvdu skipanir, har inntøkuskatturin hjá manningini so ella so verður latin reiðaríinum.

Men tó at FAS ætlandi skuldi verða nýggi bulurin í føroysku handilsskipavinnuni og harafturat verða agnið, ið kundi lokka útlendsk skipa at skráseta seg undir føroyskum flaggi, so lótu broytingarnar í skattalógini eisini hurðarnar á víðan vegg fyri onnur útlendskt handilsskip, sum ikki vóru skrásett í FAS, at fáa somu skattasømdir.

Tí í skattalógini kom at standa, at skip skrásett í útlandinum, sum uttan manning verða leigað føroyskum reiðaríum í sonevndari bareboat-leigu, sleppa at virka undir neyvt somu skattligu treytum sum tey føroyskt skrásettu skipini.

Tað merkir, at tey fáa somu skattligu afturbering sum FAS-skipini, men sleppa kortini undan at lúka treytirnar í FAS og at rinda kostnaðin fyri at vera skrásett har.

Og tað eru hesi skipini, ið hava fingið eyknevnið skatta-FAS-skip.

**Ein snúltaraskipan**

Í nógv harrans ár varð at kalla ikki gáað um hesa margháttligu servigerð, ið skatta-FAS-skipini fáa, men seinastu tíðina er skipanin vorðin ein reyður klútur í eygunum á nógvum.

- Tað líkist ongum, at summi kunnu sleppa undan at fylgja reglunum fyri føroyskt skrásett skip. Eitt er skatta-afturberingin, og at tey sleppa undan at rinda til FAS, men fyri okkara viðkomandi er tað ringasta, at skatta-FAS-skipini sleppa undan at lúka skrásetingartreytirnar hjá FAS og eftirlitinum har. Ongin ánar, hvørjum standi hesi skipini eru í, ella hvør í veruleikanum eigur tey. Hetta er jú eisini ein tungtvigandi orsøk til, at ITF hevur skrásett føroyska flaggið sum FOC, hentleikaflagg, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, er samdur.

- Skatta-FAS er ein snúltaraskipan. Eg havi ongantíð skilt, at vit hava eina skipan, FAS, har tað kostar at vera skrásettur, og har skipini skulu ganga undir strang krøv av øllum slagi, men at vit so eisini hava eina aðra skipan, skatta-FAS, sum gevur júst somu sømdir, men sum tað onki kostar at vera í, og har ongi krøv ella eftirlit eru, sigur hann.

Hans Johannes á Brúgv, stjóri í FAS og í Sjóvinnustýrinum, staðfestir, at tað er ein politisk avgerð, at vit bæði hava FAS og Skatta-FAS, og tað tekur hann til eftirtektar.

- Ítøkiliga er tað so, at tað kostar eitt ársgjald og eitt skrásetingargjald at koma upp í FAS. Ársgjaldið er 20.000-35.000 krónur, alt eftir støðd, meðan skrásetingargjaldið, sum bara skal gjaldast einaferð, er 50.000-125.000 krónur, eisini alt eftir støðd. Hesum gjøldunum slepst undan, um hin loysnin, skatta-FAS, verður vald, sigur hann.

**Ein neyðug hurð**

Tað er tó onkur, ið væl dugir at síggja tað skilagóða í skatta-FAS. Millum annað Gunnbjørn Joensen í Hósvík, sum heldur skatta-FAS vera eina neyðuga hurð inn í sjóvinnuna hjá nýggjum aktørum.

Gunnbjørn Joensen var til fyri stuttum partur av leiðsluni hjá Thor í Hósvík, sum eigur og rekur bæði fiskiskip og frálandaskip. Gunnbjørn Joensen er enn ein av stóru eigarunum í Thor, men arbeiðir nú sum sjálvstøðugur skipaumboðsmaður.

- Skatta-FAS hevur minst líka stóran týdning um ikki størri enn sjálvt FAS. Í Thor byrjaðu vit í smáum og við lítið av pengum. Tey fyrstu frálandaskipini luku ikki treytirnar fyri skráseting í FAS, og var ongin annar møguleiki fyri skatta-afturbering, so høvdu vit ongantíð sloppið í gongd í frálandavinnuni.

- Serliga er fyrimunurin við at hava báðar skipanirnar hjá feløgum, sum reka virksemi út frá Føroyum og hava skip undir bæði útlendskum og føroyskum flaggi. Tá verða manningarnar skattaðar á sama hátt og kunnu flytast millum skipini uttan skattatrupulleikar, sigur Gunnbjørn Joensen.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



- Tað nyttar onki, hvat vit siga, ella hvørji prógv og argumentir vit leggja á borðið. Avgerðin hjá ITF er tikin frammanundan, og hon sigur, at føroysk skip framhaldandi skulu vera FOC, sigur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

# FMU um hentleikaflaggið:

# Bólturin liggur hjá myndugleikunum

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið eru samd um, at tey fáa ikki gjørt meira fyri at fáa ITF at strika FAS-flaggið av listanum yvir hentleikafløgg. Í Vinnuhúsinum eru tey ikki samd í hesum.**

Síðani 2011 hevur Merkið verið skrásett sum hentleikaflagg, FOC – Flag Of Convinience – hjá ITF (International Transport Workers' Federation). ITF er altjóða fakfelagið hjá teimum, ið arbeiða innan flutningsvinnu.

Føroysku manningarfeløgini hava gjøgnum teirra samstarvsfelag FMU (Faroe Maritime Union) limaskap í ITF, og í mars vóru formenninir í teimum trimum manningarfeløgunum á fundi við ITF í Keypmannahavn í eini roynd at kyrra hini norðurlondini og fáa tey at sleppa kravinum um, at føroyska flaggið framhaldandi skal vera skrásett sum FOC. Tað var nevniliga eftir kravi frá hinum norðurlondunum, at Merkið í 2011 varð skrásett sum hentleikaflagg.

**Deyv oyru**

Fundurin í Keypmannahavn var úrslitaleysur, men í mai var enn ein roynd gjørd, tá Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, saman við Sjúrði Heinesen, skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum og skrivari í FMU, var í London, har ITF hevur høvuðssæti, og tingaðist.

Men tað var sum at tala fyri deyvum oyrum.

- Har var onki at gera. Tað var eyðsýnt, at avgerðin var tikin frammanundan, at sama hvørjum argumentum, vit borðreiddu við, so skuldi føroyska flaggið ikki strikast sum FOC, sigur Annfinnur Garðalíð.

**Viðurskiftini eru í lagi**

Sambært honun eru tað serliga umboðini fyri tey svensku, donsku og norsku sjómannafeløgini, sum liggja í buktini.

- Tey argumentera við, at manningarviðurskiftini umborð á FAS-skipunum, sum ikki eru føroysk av uppruna, eru annaðhvørt ógreið ella ikki í samsvar við ITF-reglurnar. Men tað er nakað tvætl, tí viðurskiftini umborð á føroysku FAS-skipunum eru í lagi, og tey eru eins greið og tey umborð á skipunum, sum eru skrásett í teimum norsku og donsku altjóða skipaskrásetingunum.

- Eitt annað argument er, at so stórur partur av FAS-flotanum í veruleikanum hevur útlendskan eigara.

heldur fram á næstu síðu >

Men tað vil so vera í einum so lítlum landi sum Føroyum, har tað jú er avmarkað, hvussu stórt talið av upprunaføroyskum handilsskipum kann vera. Men her og á fleiri øðrum økjum setir ITF okkum krøv, sum tey ikki høvdu funnið upp á at sett teimum stóru londunum, sigur formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

**Fortørnaður inn á ITF**

Hann heldur, at ITF hevur misskilt sína uppgávu sum altjóða fakfelag, tí tað eru ikki lønar- og arbeiðsumstøður hjá sjófólkinum, sum felagsskapurin hevur umsorgan fyri í hesum málinum.

- Eg má siga, at eg eri fortørnaður inn á ITF í hesum málinum, tí hetta snýr seg bara um proteksjonismu – hini norðurlondini eru einfalt bangin fyri, at teirra skip fara at flagga út og lata seg skráseta í FAS. Men tað eigur ikki at vera uppgávan hjá ITF at renna ørindi fyri seráhugamál hjá einstøkum londum og teirra reiðaríum. ITF skal halda eyga við, at manningarviðurskiftini eru í lagi, og tað eru tey í FAS, sigur formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag og leggur afturat:

- Tað eru annars dømi um, at ITF av sínum eintingum hevur gjørt sáttmálar við skip, sum eru nógv verri enn sáttmálarnir í heimlandinum hjá skipinum. Her hevur ITF beinleiðis verið inni og sett hýrurnar niður. So her er talan um dupultmoral, so tað stendur eftir.

Annfinnur Garðalíð heldur ikki, at manningarfeløgini fáa gjørt meira, og at Føroyar og FAS helst bara mugu liva við, at føroyska flaggið er hentleikaflagg í ITF-høpi.

- Tað nyttar onki, hvat vit siga, ella hvørji prógv og argumentir vit leggja á borðið. Avgerðin er tikin frammanundan, og hon sigur, at føroysk skip framhaldandi skulu vera FOC, staðfestir hann.

**MF skilir atfinningar**

Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, er samdur í, at føroysku manningarfeløgini ikki fáa gjørt meira, men hann skilir partvíst atfinningarnar hjá ITF og heldur eisini, at føroysku myndugleikarnir kunnu gera meira fyri at bøta um umdømið hjá FAS-flotanum.

- Manningarfeløgini hava gjørt tað, tey kunnu, og grundleggjandi liggur okkara loyalitetur hjá ITF, sum jú er okkara altjóða fakfelag. At ónøgd er í hinum Norðurlondunum, tá skip undir føroyskum flaggi sigla innanoyggjasigling har, tað skilji eg eisini væl. Tað hevði neyvan heldur dámt okkum, um til dømis Strandferðslan sigldi undir norskum ella svenskum flaggi. Allar lampur hesum viðvíkjandi lýstu reytt, tá norska Norlines kom upp í FAS fyri fýra árum síðani, og seinni komu svenskir sleipibátar eisini inn, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.

**Ivi um eigaraskap**

Tað, sum hann heldur, at føroysku myndugleikarnir serliga eiga at hyggja eftir, tá tað snýr seg um at betra um umdømið í ITF og úti í heimi annars, er opna hurðin til skattaafturbering til skip, sum ikki eru skrásett í FAS. Tað eru bareboat-leigaðu skipini undir fremmandum flaggi, ella skatta-FAS-skipini, sum tey eisini verða rópt í maritima umhvørvinum.

- ITF setir spurnartekin við, hvør veruliga rekur hesi skipini, og um tey ikki bara sleppa sær undan at rinda hýrur og skatt í londunum, har veruliga reiðaravirksemið aftanfyri skipini er. Eitt hugtak, sum ofta stingur seg upp, tá vit tosa við ITF um hesi tingini, er "beneficial ownership", sum er ein konstruerað eigaraskráseting, alt eftir hvør skal hava fyrimunin av henni, sigur Páll Hansen.



- Vit hava sanniliga roynt at broyta alt tað, vit kunnu, fyri at ganga ITF á møti, og hava enntá framt lógarbroytingar sigur Hans Johannes á Brúgv, stjóri í Sjóvinnustýrinum og FAS.

## FAS-stjórin:

# Eg fái onki gjørt við ITF

**Sjóvinnustýrið hevur roynt alt tað, tey kunnu fyri at ganga ITF á møti, sigur stjórin og vísir á, at ITF berjist fyri fakfelagsrættindum, meðan Sjóvinnustýrið/FAS umsitur trygd á sjónum.**

Hans Johannes á Brúgv, stjóri í Sjóvinnustýrinum, heldur eisini, at tað er óheppið, at føroyska flaggið er skrásett sum FOC í ITF, men hann heldur ikki, at Sjóvinnustýrið fær gjørt stórvegis meira fyri at broyta ta støðuna, enn stýrið longu hevur gjørt.

- Vit hava sanniliga roynt at broyta alt tað, vit kunnu, fyri at ganga ITF á møti, og hava enntá framt lógarbroytingar. Millum annað hava vit broytt paragraf 9 í FAS-lógini, sum er um sáttmálaviðurskiftini. Vit hava eisini víst, at okkara marknaðarføring ikki er so aggressiv, sum ITF vildi vera við, tá talið av FAS-skrásetingum øktist ógvusliga árini 2008-2012, tí síðani tá hevur økingin verið nógv minni ógvuslig. Og vit halda eisini, at sonevnda "genuine link" er vorðið betri – altso ektaða sambandið millum skrásettu skipini og Føroyar sum flaggland, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Hann vísir annars á, at ITF er ein felagsskapur av fakfeløgum, sum berjist fyri nøkrum fakfelagsrættindum, meðan Sjóvinnustýrið/FAS stutt sagt umsitur trygd á sjónum og stál.

- Vit umsita eina skipan, sum hevur eftirlit við, at skipini lúka tey altjóða krøvini, ið vit hava bundið okkum til at ganga undir. Tað gera vit til lítar, og tí eru vit til dømis á hvíta lista hjá Paris MoU, staðfestir Hans Johannes á Brúgv.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



- Manningarfeløgini mugu vera áhaldin, blíva við at ganga á ITF og um neyðugt júka fyri at fáa loyst henda trupulleikan, sigur Esther Dahl, ráðgevi fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip í Vinnuhúsinum.

# RFF:
# Manningarfeløgini mugu vera meira áhaldin í ITF

**Esther Dahl, ráðgevi í hjá Reiðarafelagnum fyri Farmaskip í Vinnuhúsinum, heldur ikki, at føroysku manningarfeløgini í FMU hava gjørt nóg mikið fyri at fáa reinsað føroyska flaggið í ITF. FOC-skrásetingin hevur negativa ávirkan, tá tað snýr seg um at fáa fleiri skip undir føroyskt flagg, staðfestir hon.**

Hugtakið hentleikaflagg – FOC – er ikki ein góðskustandardur, sum nakar altjóða myndugleiki varðar av, og hugtakið er millum annað ikki viðurkent av altjóða reiðarasamtakinum ICS (International Chamber of Shipping), har Reiðarafelagið fyri Farmaskip, RFF, er limur. Hóast hetta hevur tað kortini keðiliga ávirkan á føroyska farmaskipaflotan, at føroyska flaggið er skrásett sum hentleikaflagg í ITF (International Transport Workers' Federation).

Tað staðfestir Esther Dahl, ráðgevi fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip, RFF, í Vinnuhúsinum. Hon situr eisini í arbeiðsbólkinum, sum Poul Michelsen, uttanríkis- og vinnumálaráðharri, hevur sett at orða eina maritima strategi og ein maritiman politikk fyri Føroyrar.

- Tá tað stendur á jøvnum millum tvey ella fleiri skip í kappingini um kontraktir á altjóða marknaðinum, so telur tað í seinasta enda niður, um eitt skip er skrásett sum FOC í ITF. Tað er eisini hent, at ein møguligur kontraktpartnari hevur vent sær til okkum fyri at spyrja um hesi viðurskiftini. Eg havi eisini frætt um reiðarí, sum hava umhugsað sín limaskap í FAS orsakað av, at føroyska flaggið er skrásett sum hentleikaflagg í ITF, sigur hon.

Hetta seinasta váttar Hans Johannes á Brúgv, stjóri í FAS, men hann veit kortini ikki um nakað reiðarí, sum hevur gjørt bart og valt FAS frá orsakað av hesum.

### Fakfeløg mugu júka

Esther Dahl sigur, at í teimum førunum, RFF hevur havt høvi at gera vart við seg mótvegis ITF, hava tey roynt at sannføra fakfelags-felagsskapin um, at Merkið ikki hoyrir heima á einum lista yvir hentleikafløgg. Men hon heldur, at føroysku manningarfeløgini eiga at vera meira áhaldin.

RFF sigur í síni ársfrágreiðing fyri 2015 millum annað soleiðis:

"Føroyska røddin í ITF er føroysku manningarfeløgini, og tað tykist tíverri ikki at liggja teimum frammalaga at fáa loyst trupulleikan."

Frágreiðingin varð skrivað í februar í ár, áðrenn FMU fór í tingingar við ITF um at fáa strikað føroyska flaggið sum FOC.

- Nú hava tey so verið bæði í Keypmannahavn og í London og roynt at mýkja ITF. Tað er gott. Men eg haldi ikki, at manningarfeløgini kunnu loyva sær bara at leggja kong, tí onki spurdist burtur úr hesaferð. Manningarfeløgini eru beinleiðis partur av ITF og mugu vera áhaldin, blíva við at ganga á tey og um neyðugt júka fyri at fáa loyst henda trupulleikan. Í seinasta enda gongur tað væl saktans eisini út yvir teirra egnu limir, at føroyska flaggið av teirra altjóða lagsbrøðrum er skrásett sum hentleikaflagg, sigur Esther Dahl.




FAROE SHIP

FAROE SHIP P/F Tlf. 349000
info@faroeship.fo




**Eik Banki P/F**, Tel. 348000
eik@eik.fo , www.eik.fo

Eik
Tað snýr seg um teg

tekstur: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** -*PRESS*



Tvey ymisk álit hava síðan 2006 mælt til, at føroysku sjóvinnuútbúgvingarnar skulu uppstigast á bachelorstig. Men enn er onki hent.
Mynd: Zacharis Hammer

# Maritimar útbúgvingar ligið í dvala

**Fyri 10 árum síðan var farið undir ætlanirnar at uppstiga útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum á bachelorstig. Men seinnastu árini hevur lítið og onki verið at hoyrt til málið.**

Innan maritima økið er breið semja um, at rættast er at uppstiga skipsføraraútbúgvingina og maskinmeistaraútbúgvingina á bachelorstig. Fleiri røddir eru frammi um, at vit eiga at fylgja við maritimu útbúgvingunum uttanlands, annars gerast vit eftirbátur. Men í løtuni hendir lítið ella onki í málinum. Og í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu verður onki sagt um maritimar útbúgvingar.

Í 2006 var málið um bacheloruppstiging annars nógv frammi, og hetta sama árið gjørdi Vinnuháskúlin eitt álit, sum nevnt var "Álit um bachelorútbúgvingar í Vinnuháskúlanum."

**Bachelor í Føroyum**

Á Vinnuháskúlanum vóru tey ikki í iva um, at vit skulu hava maritimar bachelorútbúgvingar í Føroyum. Í niðurstøðuni í álitinum verður sagt:

"Maritimu útbúgvingarnar hava alla tíðina, síðani tær komu fyri eini øld síðan, ment seg við samfelagsgongdini. Gongdin í dag í Føroyum og øllum Evropa er, at allar hægri útbúgvingar verða skipaðar eftir Bolognaavtaluni. Í grannalondunum eru hægri maritimar útbúgvingar á bachelorstøði, og í Føroyum eru og verða fleiri bachelorútbúgvingar. Føroysk sjófólk eiga at fáa sama møguleika sum aðrir føroyingar, og sum sjófólk í grannalondunum. Hesa niðurstøðu koma Vinnuhúsið og føroyskir politikarar eisini til í viðgerðini av Visjón 2015.

Bæði fólk við miðnámsprógvi og tey við verkligum royndum skulu hava góðar møguleikar at fáa ávikavist verkligt og ástøðiligt upptøkuskeið, so tey kunnu fáa eina maritima bachelorútbúgving á Vinnuháskúlanum.

Sjófólk, sum ikki ætla sær eina bachelorútbúgving, skulu framvegis hava góðan møguleika at fáa eina styttri maritima útbúgving, sum gevur rættindi til størsta partin av føroyska flotanum.

heldur fram á næstu síðu >

> **“Fleiri røddir eru frammi um, at vit eiga at fylgja við maritimu útbúgvingunum uttanlands, annars gerast vit eftirbátur. Men í løtuni hendir lítið ella onki í málinum.”**

Vinnuháskúlin eigur skjótast til ber – til dømis eftir leisti frá Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum – at fara í gongd við at eftirútbúgva lærarar, so at nóg nógvir um fá ár hava førleika at undirvísa á bachelorútbúgvingum. Mælt verður til, at upptøka til bachelorútbúgvingar verður fyrstu ferð á sumri 2008,” stendur altso í niðurstøðuna í álitinum hjá Vinnuháskúlanum í 2006.

**Nýtt tilmæli í 2010**

Í 2009 setti táverandi landsstýrismaðurin við vinnumálum ein arbeiðsbólk við umboðum fyri viðkomandi myndugleikar og umboð fyri vinnuna at orða ein politikk fyri føroyska sjóvinnu. Í bólkinum sótu Maria Róin, Vinnumálaráðið, Esther Dahl, Reiðarafelagið fyri Farmaskip, Óli Hans Hammer Olsen, Maritimt Forum, Tommy Petersen, FAS, og Vilhjálmur Gregoriussen fyri Skipaeftirlitið.

Arbeiðsbólkurin sigur millum annað í hesum “Uppskoti og tilmæli”:

“Mælt verður til, at tað skal gerast møguligt at taka bachelorútbúgving á Vinnuháskúlanum til skipsførara og maskinmeistara, sum ein bólkur á Vinnuháskúlanum mælti til í Áliti um bachelorútbúgving á Vinnuháskúlanum frá juni 2006.”

Og arbeiðsbólkurin frá 2010 sigur víðari:

“Í hinum Norðurlondunum og í Bretlandi ber til at lesa til skipsførara og maskinmeistara á bachelorstøði. Útbúgvingarnar skulu sjálvsagt verða lagaðar til tørvin úti í vinnuni, og mugu í minsta lagi vera á sama teoretiska støði sum útbúgvingar frá útlendskum lærustovnum.

Um útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum verða umskipaðar til bachelorstøði, fer hetta at geva betri møguleika fyri at sleppa framat at nema sær kandidat/master útbúgvingar. Hetta hevði styrkt um førleikarnar innan sjóvinnuna, soleiðis at størri virksemi kundi verið skipað á landi – reiðaravirksemi.”

Arbeiðsbólkurin vísir á, at bæði einstaklingar og samfelagið í síni heild vera fyri stórum avbjóðingum í alheimsgerðini, í kunningartøkni og kapping, og tí herðast krøvini til útbúgvingar. Tí má førleikastøðið hjá føroyskum sjófólki vera á sama støði sum í øðrum londum, um vit framhaldandi skulu standa okkum í kappingini um at vera ein av fremstu veitarunum av vælskikkaðari arbeiðsmegi til handilsflotan,” verður sagt.

**Miðnámsskúli**

Arbeiðsbólkurin kemur eisini inn á millum annað miðnámsútbúgvingar.

“Í løtuni hevur bert ein heilt lítil partur av teimum, sum byrja á Vinnuháskúlanum, frammanundan tikið miðnámsútbúgving. Sambært Visjón 2015 verður miðað eftir, at øll ung fáa eina miðnáms- ella yrkisútbúgving. Um hesin málsetningur fer at verða rokkin, átti tað ikki at verið ein trupulleiki viðtilgongdini til sjóvinnuútbúgvingarnar, um tað verða umskipaðar til bachelorútbúgvingar og roknast má við, at ungdómurin av sær sjálvum tillagar seg til herdu krøvini.”

**Skiparar og maskinistar**

Tvær av týdningarmiklu útbúgvingunum á Vinnuháskúlanum eru tær styttru útbúgvingarnar til skipara og maskinist. Og bólkurin mælir til, at hildið verður fram við hesum útbúgvingum.

“Mælt verður til, at tað framhaldandi eisini skal vera møguligt at taka útbúgving sum skipari ella maskinistur eftir sama leisti sum í dag, ætlað millum annað teimum, sum vilja sigla sum yvirmenn við fiskiskipum.”

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað átti at verið møguligt at tikið styttri og miðallangar útbúgvingar í Føroyum ella í samstarvi við útlendskar lærustovnar, sum eru málrættaðar til arbeiði innan sjóvinnu – eitt nú innan logistikk, teknisk viðurskifti við meira.

Og so er tað, at arbeiðsbólkurin mælir til, at vit skulu hava so væl útbúgvið fólk innan sjóvinnuna, at vit kunnu granska í økinum.

“Í grannalondunum verður granskað nógv innan sjóvinnuøkið, tað verið seg innan skipabygging, útgerð ella logistikk – serstakliga verður nógv gjørt fyri at finna umhvørvisvinarligar loysnir á øllum økjum. Sjóvinnan ger stórar íløgur í og leggur stóran dent á at hava væl útbúgvin starvsfólk, tí hetta vísir seg at síggjast aftur í kappingini á altjóða marknaðinum. Tískil hevur tað týdning, at Føroyar kunnu bjóða maritimar førleikar á høgum støði og at betri møguleikar verða í Føroyum at granska innan hetta økið. Hetta kann eisini hava við sær, at nýggjar loysnir innan eitt nú útgerð við meira kunnu verða funnar og harvið hjávinnur verða skaptar. Mælt verður til at tillaga galdandi stuðulsskipanir hjá tí almenna soleiðis, at granskingar- og menningarverkætlanir innan maritima økið verða raðfestar sum eitt “innsatsøki”, sigur arbeiðsbólkurin í “Uppskoti og tilmæli um sjóvinnupolitikk” í juli 2010.

Vit hava roynt at fingið eina viðmerking frá Rigmor Dam, landsstýriskonu í mentamálum, men uttan úrslit. Umframt at ringja sendu vit henni nakrar spurningar skrivliga, men svar kom onki, áðrenn blaðið fór til prentingar. Vit høvdu annars hugsað okkum at frætt, hvussu hon sær upp á málið um bachelorútbúgvingar á Vinnuháskúlanum, og um hon ætlar at gera nakað til tess at skunda undir málið.



tekstur: GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN -PRESS



Føroyska sjóvinnan skal altíð ganga á odda, halda oddafiskarnir í Maskinmeistarafelagnum og Føroya Skipara- og Navigatørfelag.
*Mynd: Zacharias Hammer*

# Manningarfeløg: Bachelor í sjóvinnuútbúgvingunum

## Nú er stundin komin at Vinnuháskúlin eisini bjóðar sjóvinnuútbúgvingar á bachelorstøði, halda formenn í manningarfeløgum.

- Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum skulu avgjørt bjóðast fram á bachelorstigi. Ein av grundunum er, at skalt tú fylgja við menningini innan maritimu útbúgvingarnar uttanlands, so noyðist tú at fylgja við. Annars gerast við eftirbátur á maritima økinum.

Tað halda Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, og Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

- Um vit t.d. fara nøkur ár aftur í tíðina, so sóu vit, at lærarar kundu fáa starv á Sjómansskúlanum, høvdu teir hægstu nautisku útbúgving. Í dag skalt tú helst hava bygt upp á skipsføraraútbúgvingina við einari master ella líknandi. Tað merkir, at størri krøv verða sett til tey, ið undirvísa á Vinnuháskúlanum í dag, enn gjørt varð fyrr. Men tú hevur ikki sett samsvarandi krøv til tey, sum fara út av skúlanum, sigur hann.

### Nógvir útlendskir navigatørar

Formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag vísir eisini á, at í dag verða nógvir yvirmenn skiftir út við útlendskar, bíligari navigatørar. Spurningurin er tí, hvar føroysku navigatørarnir skulu fara, hava teir ikki til dømis eina bachelorútbúgving.

- Í dag eru krøvini fyri at fáa eitt starv mangan herd. Kravt verður stundum, um tú skalt hava starv á landi, at tú hevur í minsta lagi eina bachelor ella meira. Tí er tað so neyðugt, at Vinnuháskúlin fær loyvi at útbúgva bachelorar.

Hann dugir væl at síggja, at ávísir vansar kunnu vera við hesum, til dømis at rekrutteringin verður lægri, um krøvini at sleppa inn á Vinnuháskúlan verða til dømis miðnámsskúli.

- Men tíðin krevur, at vit fylgja við á maritima útbúgvingarøkinum, heldur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

heldur fram á næstu síðu >

Vit mugu ikki liggja sum ein blindtarmur á útbúgvingarøkinum, heldur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.
*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*



**Í tøkum tíma**
Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen, er samdur við Annfinni Garðalíð.

- Tað er í tøkum tíma at farið verður undir ein tilgongd fram ímóti einari bachelorskipan fyri føroysku sjóvinnuútbúgvingarnar. Tí skulu vit varðveita kappingarførið á maritima arbeiðsmarknaðinum, er neyðugt, at næmingar á Vinnuháskúlanum, sum hava hug til tað, kunnu nema sær útbúgving á bachelorstigi. Og tá eru eisini allar hurðar opnar til útbúgvingar innan eitt nú shippingvinnuna og skipsverkfrøði. Haraftrat føra styrktu førleikarnar við sær, at bæði FAS og alt virksemið á landi í sambandi við FAS verður styrkt. Øll hini norðurlondini hava eisini bachelorútbúgvingar, uttan Ísland, sum hevur sína heilt serligu skipan. Tí er tað av størsta týdningi, at útbúgvingarstigið alla tíðina er í toppinum sammett við onnur lond, sigur Páll Hansen.

- Alternativið til føroyskar bachelorútbúgvingar innan sjóvinnu er, at næmingar, sum ætla sær undir víðari lestur eftir at hava lokið tær vanligu sjóvinnuútbúgvingarnar sum annaðhvørt maskinmeistari ella skipsførari, velja Vinnuháskúlan frá og fara beinleiðis uttanlands at nema sær útbúgving.

- Tí er tað sera gott, at kjakið um sjóvinnuútbúgvingarnar nú mennist aftur, so vit sum skjótast kunnu leggja lunnar undir eina bachelorútbúgving á Vinnuháskúlanum, heldur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Hann heldur tað vera ógvuliga umráðandi, at vit á maritima útbúgvingarøkinum ikki liggja sum ein blindtarmur her í Norðuratlantshavi.



Tað er av størsta týdningi, at vit fylgja við herdu krøvunum á útbúgvingarøkinum í londumum, vit stundum samanbera okkum við, heldur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.
*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*



tekstur: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** *-PRESS*





Tað ræður um at geva einari nýggjari útbúgving rætta innihaldið, sigur Wilhelm Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum.

# Vinnuháskúlin er til reiðar

**- Vit eru til reiðar at fara undir fyrireikingar til bachelorútbúgvingar nú, skuldi tað verið. Vit hava valt at fáa nøkur grundleggjadi viðurskifti uppá pláss fyrst. Skiparaaspiranturin er settur í verk og í løtuni verður arbeitt við at tilevna eina skipan til maskinmeistara-aspirantin. Tað næsta í røðini er hóskandi ein bachelor-yvirbygningur. Tað sigur stjórin á Vinnuháskúlanum, Wilhelm Petersen.**

- Hóast tøgn hevur verið í málinum í eina tíð, so er áhugi framvegis fyri málinum. Tað er áhugi fyri, at bæði maskinmeistarar og skipsførarar skulu kunna taka bachelor, um førleikin og áhugin er til staðar hjá næmingunum, sigur Wilhelm Petersen.

Í tí sambandi er neyðugt at leggja nakað afturat útbúgvingini innihaldsliga. Serliga spennandi heldur hann tað vera at koyra meira handilslig og kommersiell evni inn í útbúgvingina, tá ið tað snýr seg um skipsførara-útbúgvingina

- Sum nú er, eru skipsførarar til dømis væl fyri at flyta eitt skip frá A til B. Og tað hava føroyingar allar tíðir verið dugnaligir til, eisini í maskinini. Men tað handilsliga, reiðaravirksemi til dømis, hevur ikki verið ein partur av útbúgvingini. Aðrastaðni er shipping-parturin ein stórur partur, og tað er ein veldug vinna í útheiminum, og tað kann tað eisini gerast til í Føroyum, sigur stjórin á Vinnuháskúlanum.

**Miðnámsskúli ongin fortreyt**

Partur av kjakinum, sum hevur verið um uppstiging til bachelor, hevur snúð seg um upptøkukrav. Sambært uppskotinum hjá Vinnuháskúlanum frá 2006 varð skotið upp, at tú annaðhvørt skuldi taka fyrireikingarskeið ella hava miðnámsskúla. Tú skuldi altso annaðhvørt taka eitt árs fyrireikingarskeið ella hava trý ára miðnámsskúla. Síðan skuldu næmingarnir taka trý ár aftrat fyri at gerast bachelorar. Røddir hildu tá, at hetta fór at sálda annars væl háttaðar næmingar frá, og at tilgongdin til skipsførara og maskinmeistara fór at minka.

Wilhelm Petersen er ósamdur við omanfyri nevnda modelli. Hansara modell er heilt øðrvísi, og gevur møguleika hjá fólki at søkja inn á skúlan júst sum í dag.

- Í dag fara næmingar út av skúlanum við flottum prógvum og fáa frálík arbeiði, eisini teir, sum ikki hava miðnámsprógv. Hetta skal kunna halda fram, um vit fáa eina nýggja skipan, sigur hann.

Hann heldur, at tað at gera sum í Danmark, bara at kalla útbúgvingina eina professjónbachelor, tað ger útbúgvingina hvørki betri ella verri. Tað ræður um at geva útbúgvingini neyðuga innihaldið, so tú veruliga kanst rópa tað eina bachelorútbúgving.

Modellið hjá stjóranum á Vinnuháskúlanum er soleiðis, at søkjast kann inn á skúlan sum í dag, og eftir trý ár kunnu teir næmingar, ið hava hug at fara í sjóvinnuna, gera tað. Samstundis kunnu teir næmingar, ið hava áhuga og førleika til tað, taka ein yvirbygning upp á eitt til hálvtannað ár, og so fáa bachelorprógv. Hesir næmingar kunnu so lesa víðari og enda sum granskarar til dømis.

**Fróðskaparsetrið**

Í løtuni eru tað ikki allir lærarar á Vinnuháskúlanum, ið eru útbúnir at hava frálæru á bachelorstigi, men nógvir eru tað. Og fleiri lærarar á Vinnuháskúlanum undirvísa eisini á Fróðskaparsetrinum.

- Skulu vit hava eina veruliga bachelorútbúgving, og tað haldi eg, at vit skulu hava, so er neyðugt við einum universiteti, og tað er Vinnuháskúlin ikki. Men vit eru í samráðingum um samstarv við Fróðskaparsetrið, og tað sær gott út. Á Setrinum eru tey sinnaði at samstarva við okkum um nýggju útbúgvingina, sigur hann.

- Vit hava eisini fingið áheitan úr Mentamálaráðnum at siga okkara hugsan um uppstiging til bachelor, og ta frágreiðingina eru vit í ferð við at orða í løtuni, sigur Wilhelm Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum.

# Tú ringir
# vit heinta

Telefon 41 42 43




## Gev spilloljuni **nýtt** virði

IRF

**IRF** · Telefax: 41 42 44 · FO-520 Leirvík · irf@irf.fo

tekstur og myndir: **ØSSUR WINTHEREIG** *-PRESS*



Jan Pieter De Vris, skipari á Botnia, hevði fleiri ferðir áður verið á Fuglafirði.

# Fyrsti loðstúrur hjá Jákupi Jørgensen

## Mið og Magn var við Jákupi Jørgensen á hansara fyrstu loðsuppgávu fyri havnarskrivstovuna í Fuglafirði.

Russiski tangabáturin Botnia boðar frá á vhf-inum, at teir eru við waypoint 5. Tað er eystur úr Mjóvanesi.

Vit eru á havnarskrivstovuni í Fuglafirði. Klokkan er 23.02 og Botnia vantar at vera á loðspunktinum ein hálvan fjórðing úti á Pollinum um ein lítlan tíma.

Jákup Jørgensen er á vakt á havnaskrivstovuni í Fuglafirði. Hetta er fyrstu ferð hann skal umborð á eitt skip, sum loðsur. Hann hevði sín fyrsta arbeiðsdag á havnarskrivstovuni í gjár. Men Jørgen er ein royndur skipsførari. Hann er farin um pensjonistaaldur, men hevur tikið eykaútbúgving í Havn, so hann kann vera avloysari á havnarskrivstovuni.

- Eg havi gingið á skúla í tveir mánaðir, har eg havi tikið ymsar dagføringar og ymisk skeið, sigur Jákup Jørgensen.

### Síggja heilt til Hetlands

Hann situr aftan fyri kontrolborðið og fylgir við, hvussu langt Botnia er komin.

Botnia er ein russiskur tangabátur, sum kemur við olju til oljugoymlsurnar í Fuglafirði. Teir hava 8200 tons av tungolju umborð.

Botnia hevur verið á Fuglafirði fleiri ferðir áður, men lógin krevur, at allir tangabátar hava loðs umborð, tá teir leggja at. Tað er agenturin hjá skipunum, sum boðar frá, at teir skulu hava loðs.

Jákup sigldi í Føroyum í eini 20 ár, áðrenn hann sum 45-ára gamal fór upp á skúla til skipsførara. Mesta av tíðini í Føroyum var hann skipari á sandbátum.

Á skíggjanum á skrivstovuni hava teir kort, har teir síggja heilt til Hetlands. Størru skipini skulu øll hava AIS, sum vísir, hvat tey eru stødd. Men eisini

nógvir smærri bátar hava AIS, ikki tí tað er eitt krav, men fyri trygdina skyld.

Krøvini til, hvørji skip skulu hava loðs, eru ásett í løgtingslóg um havnaloðsing, vanliga nevnd loðslógin. Lógin er galdandi fyri sigling inn og úr úr føroyskum havnum. Tað eru kommunurnar, sum hava skyldu at loðsa skip í ella úr havnum í kommununum.

Høvuðsreglan er, at skip 1000 BT og størri skulu brúka loðs. Harafturat eru øll olju-, gass- og kemikaliuskip fevnt av loðsskyldu.

Føroysk fiskiskip eru ikki fevnt av loðsskyldu. Heldur ikki hjá Strandferðsluni og onnur almenn skip. Haraftuat er ásett í lógini, at skip, har vakthavandi navigatørur er væl staðkendur ber til at søkja um loðsfrítøku.

**Pilot altíð klárur**

Havnarskrivstovan í Fuglafirði hevur fasta avtalu við sleiparan Pilot, sum er til reiðar 24 tímar um samdøgurið og virkar sum loðsbátur.

- Nú er hetta krav, at Botnia skal hava loðs, men annars er leiðin inn til oljutangarnar púra rein. Man skal bara hyggja eftir aliringunum, sigur Jákup Jørgensen. Men hetta er gott fyri okkum, tí tað er ein góð trygd í tí.

Í loðslógini verður sagt, at endamálið við at krevja loðstar er at betra um trygdina og at verja umhvørvið.

Jákup Jørgensen ger seg kláran til sín fyrsta loðstúr. Vit skulu báðir hava bjargingarpylsu.

- So taki eg eisini internetantennu við. Tað plaga teir at vera glaðir fyri, sigur Jákup Jørgensen.

Fuglafjarðar Havn hevur ein sera sterkan routara til internet, har samband fæst við umvegis internetantennuna, sum Jákup tekur við umborð.

Vanliga er nógv at gera í havnini í Fuglafirði. Í fjør komu 860 skip á Fuglafjørð og av teimum kunnu vóru eini 250 skip, sum høvdu loðs inn og út.

**Skiparin er staðkendur**

Vit fara umboð á Pilot og sigla spakuliga út á pollin. Botnia kemur inn á boarding point, har Pilot skal sigla upp á síðuna av honum, og Jákup og undirritaði skulu loypa umborð. Loðsleytarin er í stýriborði og boardingferðin er fimm míl.

Botnia er eitt nýtt tangaskip ella kemikaliuskip og er vælhildið.

Á brúnni stendur skiparin, sum er hollendari, og vísir, at hann kennir Fuglafjørð.

- Eg havi verið her eini 6-7 ferðir fyrr, sigur hann.

Skiparar, sum javna sigla útlendsk skip í føroyska havn kunnu fáa loyvi, at sleppa undan loðsi, men ikki tá tað ein tangaskip.

Jákup Jørgensen visti áðrenn hann kom umborð, at hann skuldi bara vera har, tí lógin krevur tað. Hann riggar internetantennuna til og har eru nøkur skipsskjøl, sum skulu undirskrivast.

Skiparin fer róliga inn móti oljukeiini.

-Hann dugur sera væl, sigur Jákup Jørgensen um skiparan.

Á bryggjuni stendur maðurin sum skal taka móti endanum.

- Fimm metrar longri og vit liggja, sigur skiparin við mennirnar har frammi.



Gordon Petersen, maskinmeistari á loðsbátinum Pilot og Jákup Jørgensen.

tekstur og myndir: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** -PRESS




Fakfeløgini fara nú at keypa upp í 50 prosent av LÍV

# Nú verður LÍV keypt

**Nú er greitt hjá teimum mongu fakfeløgunum í sp/f Fakfelag at keypa LÍV. Tryggingareftirlitið hevur góðkent P/F Fakfelag sum keypara, og yvirtøkudagurin er settur at vera 1. september í ár.**

- Tað er vorðið væl bíligari at tekna tryggingar og hava sína eftirløn í LÍV, tí eitt krav frá fakfeløgunum var, at umsitingargjaldið skuldi niður. Og tað er farið munandi niður, síðan fakfeløgini fóru undir tilgondina at keypa LÍV. Nýggju eigararnir fara framhaldandi at arbeiða fyri, at umsitingargjaldið skal enn longur niður, soleiðis at tað verður upp aftur bíligari at hava sínar eftirlønar- og samlagstryggingar hjá LÍV.

Tað sigur formaðurin í sp/f Fakfelag, Pætur Niclasen, sum eisini er formaður í S&K-felagnum.

Og teir eru væl nøgdir við niðurstøðuna hjá Tryggingareftirlitinum, Pætur Niclasen, formaður í sp/f Fakfelag, og Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Her er talan um einar 8-10.000 limir, so tað er ikki smávegis, sigur Páll Hansen.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum, Súni Selfoss, fegnast eisini um niðurstøðuna hjá Tryggingareftirlitinum. Hann sigur millum annað á heimasíðuni hjá felagnum:

"Fakfeløgini eru høvuðskundar hjá LÍV. Størsta orsøkin til keypið er, at feløgini tryggja sær beinleiðis ávirkan á, hvussu teir nógvu pengarnir, sum limirnir gjalda inn í LÍV, verða handfarnir. Í staðin fyri at eitt rakstraravlop fer út sum vinningsbýti, fer tað nú beinleiðis aftur til tryggingartakaran," sigur altso formaðurin í Starvsmannafelagnum millum annað á heimasíðu felagsins.

### Fýra ár

Gott og væl fýra ár eru nú gingin, síðan fakfeløgini bjóðaðu upp á LÍV fyrstu ferð. Og tað er ein umfatandi viðgerð, ið skal til, tá ein tryggingarfyritøka skal keypast. Nógvir snávingarsteinar hava verið á leiðini, sum allir eru sópaðir burtur, nú greitt et at keypa. Góðkenningin frá Tryggingareftirlitinum ber í sær, at P/F Fakfelag

Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum (vinstrumegin), og Pætur Niclasen, formaður í sp/f Fakfelag – og formaður í S&K-felagnum, eru væl nøgdir, nú fakfeløgini fara at keypa upp í 50% av LÍV



keypir upp í 50% av partapeninginum í P/F LÍV holding.

Nú keypið verður veruleiki, verður sp/f Fakfelag broytt til P/F Fakfelag.

Hesi feløg eru í løtuni umboðað í sp/f Fakfelag, og møguleiki er fyri, at fleiri leggjast aftrat: Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið, Starvsmannafelagið, Pedagogfelagið, S&K-felagið, Arkitektafelagið, Musikklærarafelagið, Føroya Handverkarafelag, Bioanalytikarafelagið, Ergoterapeutfelagið, Fysioterapeutfelagið, Heilsurøktarafelagið, Kost- og føðslufelagið, Ljósmøðrafelagið, Radiograffelagið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.



tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



Norska Løva í miðjuni og NMF-umboðini eru: Standandi úr vinstru: Halldór Arnar Guðmundsson, Ísland, Mikael Huss, Svøríki, Sjúrður Heinesen, Føroyar, Guðmundur Ragnarsson, Ísland, Odd Rune Malterud, Noreg, Páll Hansen, Føroyar, Leif Wikstrøm, Finnland. Sitandi úr vinstru: Jan Rose Andresen, Danmark, Gustav Schmidt, Danmark, og Per Jørgensen, Danmark.

# Hvílitíðin í fokus á NMF-fundi

Í apríl helt Nordiska Maskinbefälfederationen, NMF, fund í Føroyum. Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, er forseti í NMF, sum tilsamans umboðar umleið 30.000 maskinmeistarar og maskinistar í Føroyum, Danmark, Svøríki, Noregi, Finnlandi og Íslandi.

Hvílitíðarreglurnar fyltu nógv á fundinum, og í NMF eru tey ørkymlað av, at reiðaríir framhaldandi manna skipini soleiðis, at ásetta hvílitíðin kemur í vanda.

Reglurnar hjá bæði IMO (altjóða sjófartsfelagsskapurin) og ILO (altjóða arbeiðarafelagsskapurin) fyriskriva, at sjófólk í minsta lagi skulu hava 10 tímar hvíld í hvørjum samdøgri og í minsta lagi 77 tímar hvíld í einum samanhangandi tíðarskeiði á sjey samdøgur. Harafturat mugu ikki verða meira enn 14 tímar ímillum hvørja hvílitíð.

Tað er skipsførarin, ið hevur ábyrgdina av, at hvílitíðin verður hildin, men bæði sjófólkið, skipsførarin og reiðaríið kunnu fáa bót, um ein Port of State-kanning avdúkar brot á hvílitíðarreglurnar.

Á NMF-undinum varð eisini samtykt at krevja nýggja áseting í SOLAS um innrætting av kotroll- og maskinrúmum á skipum. Leiðreglur hjá IMO um arbeiðsvinarliga innrætting av skipabrúgvum hava nevniliga havt við sær munandi betringar av arbeiðsumstøðunum hjá brúgvamanningini.

**Bergtikin av Norsku Løvu**

Tað var ikki bara fundarvirksemi á skránni, tá NMF-umboðini vitjaðu í Føroyum.

Millum annað varð vitjað í Dómkirkjuni, men tað var ikki so nógv av áhuga fyri sjálvari kirkjuni ella føroyskari kirkjusøgu, men orsakað av Norsku Løvu.

Gustav Schmidt frá danska maskinmeistarafelagnum hevur nevniliga ein brennandi áhuga fyri eysturindiafaranum, sum fórst á Lambavík nýggjársaftan í 1707.

Gustav hevði hoyrt um, at eitt modell av skipinum og ein skipsklokka hanga í Dómkirkjuni, og fróddist hann sum ein smádrongur, tá hann slapp at skoða og kanna dýrgripirnar nærri.



Gustav Schmidt, vinstrumegin, kannaði gjølla klokkuna av Norsku Løvu, sum hongur burturgoymd á loftinum yvir kirkjukórinum í Dómkirkjuni. Saman við honum er Kartni S. Olsen, kirkjuráðslimur.

tekstur og myndir: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*



Per Gravgaard, samráðingarleiðari hjá Søfartens ledere, greiddi frá um samráðingarteknikk, og formaðurin í Føroya Skipara- og Navigtørfelag Annfinnur Garðalíð og næstformaðurin Elias Zachariasen vóru millum áhugaðu lurtararnar.

# Navigatørar brynjaðir til samráðingar

Bæði persónligar samráðingar og felags sáttmálasamráðingar vóru á skránni, tá teir báðir Per Gravgaard og Peter Friis Jespersen frá danska navigatørfelagnum Søfartens Ledere 22. juni hildu skeið í samráðingarteknikki í hølunum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag í Smærugøta í Havn.

Per Gravgaard er í starvi sum samráðingarleiðari hjá Søfartens Ledere, og Peter Friis Jespersen, vinnu- og virkisráðgevi hjá felagnum, fæst eisini nógv við sáttmálar og samráðingar.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag heldur skeiðið vera kærkomið, tí allar flestu brúgvaoffiserar í dag verða settir við støði í persónligum avtalum, sum javnan – oftast einaferð um árið – verða endurskoðaðar.

Søfartens Ledere, ið hevur nógvar føroyskar limir og sum samstarvar við Føroya Skipara- og Navigatørfelag á nógvum økjum, var eisini í Føroyum fyri at halda sín árliga limafund.



Peter Friis Jespersen, vinnu- og virkisráðgevi hjá Søfartens Ledere.

tekstur: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS* myndir: **ERLAND H. RASMUSSEN,** Vinnuháskúlin

# 31 fingu prógv

## Á hátíðarløtu á Vinnuháskúlanum fríggjadagin 24. juni fingu 11 skiparar, 10 maskinmeistarar og 10 skipsførarar síni prógv.

Skúlastjórin helt vælkomstrøðu, og Thormund Johannesen, skipstekniskur ráðgevi hjá Knud E. Hansen, var gestarøðari. Hann segði frá, at tað júst vóru 40 ár síðani, at hann sjálvur fekk stýrimansprógvið handað á Sjómansskúlanum og árið eftir prógvið sum skipsførari.

Thormund Johannesen vísti í síni livandi røðu millum annað á, hvussu góð barlast ein sjóvinnuútbúgving er, eisini um farið verður undir víðari lestur. Sjálvur læs hann til skipsverkfrøðing, og hann var ivaleysur, tá hann segði, at skipsførarútbúgvingin saman við verkfrøðiútbúgvingini gav honum nógvar førleikar og fyrimunir á arbeiðsmarknaðinum fram um teir skipsverkfrøðingarnar, sum ikki eisini hava eina sjóvinnuútbúgving.

Formenninir í teimum báðum yvirmannafeløgunum fluttu sum siður er eisini fram røðu.

Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, nam millum annað við FAS.

- Tað hevur mangan undrað meg, hví vit ongir føroyskir yvirmenn eru umborð á teimum svensku skipinum í FAS. Hesi eru sum oftast nýggj og millum mest framkomnu skip, sum sigla í dag. Yvirmannafeløgini hava sáttmála við øll hesi skip, oghugsanin hjá okkum var, at um ein er føroyingur og siglir við hesum skipum, so fær hann føroyska løn, meðan sviðin fær svenska løn. Lønin er næstan líka, segði hann millum annað.

Páll Hansen kundi annars siga nýggju maskinmeistarunum, at norðurlendskir maskinmeistarar hava eitt sera gott altjóða umdømi, sum teir kunnu vera ernir av.

Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, hugleiddi um tíðina við lippukassunum, tá menn vóru í sjálvdrátti umborð á sluppunum.

Fakligt samanhald hevði vunnið á tí órættvísi, sum sjálvdrátturin var, sló Annfinnur Garðalíð fast, men harmaðist um, at lippukassa-andin onkrastaðni var við atsníkja seg innaftur

- Í dag kunnu vit hava eina kenslu av, at sonevndi lippukassin er komin fram aftur fleiri staðni, og ikki minst í uppgangstíðini, tá alt sær lovandi út. Persónar gera individuellar avtalur, og frávelja at vera í felagsskapi. Og hetta hevur havt støðugt størri trupulleikar við sær. Fleiri hava vent sær til Føroya Skipara-& Navigatørfelag og biðið um hjálp, tí fleiri av avtalunum hildu ikki, tá á stóð. So kann spurningurin verða, hvat er styrkin hjá sjómanninum ella fakfelagnum, nevnuliga samanhald í tunnum og tjúkkum, í uppgangs- og niðurgangstíðum. Lat okkum standa saman, og verja borg um okkara vunnu rættindir, segði hann.



**Maskinmeistarar:**
Elisabeth Dalsgaard,
Jógvan Pauli Kristiansen,
Sigurd Jónsson Nielsen,
Christian Petur Djurhuus,
Søren Djurhuus Clementsen,
Erling Dávidsson Jacobsen,
Kjartan Jørgensen,
Óla Jákup Dahl,
Teinar Mohr Hentze,
Frank Højbjerg Poulsen.

**Virðislønir:**
1. Frank Højbjerg Poulsen, fartelefon frá Suðuroyar Sparikassa.
2. Erling Dávidsson Jacobsen, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.
3. Kjartan Jørgensen, grindaknív frá SEV.

**Ídnisvirðisløn:**
Elisabeth Dalsgaard, gullur frá A. P. Møller



Elisabeth Dalsgaard var einsamøll høna millum allar hanarnar til prógvhandan hesaferð. Hon bleiv liðug sum maskinmeistari og var eisini heiðrað við ídnisvirðislønini, sum var eitt gullur frá A. P. Møller.



Gestarøðarin Thormund Johannesen, skipsførari og skipsverkfrøðingur, greiddi frá úr egnum royndum, hvussu góð barlast ein sjóvinnuútbúgving er, eisini um ein ætlar víðari lestur.



**Skiparar:**
Flóvin Fossdalsá,
Eiler Haraldsen,
Esmar Æðustein Poulsen,
Hans Jacob Lind Rasmussen,
Heini Martin Jørðdal Niclasen,
Jens Arne Kruse Sørensen,
Martin Hansen,
Rúni Winther,
Hans Lyngsø,
Óli Dam,
Birgir Jakobsen.

**Virðislønir:**
1. Heini Martin Jørðdal Niclasen, kikara frá p/f Thor.
2. Birgir Jakobsen, barometur og klokku frá Faroe Agency.
3. Flóvin Fossdalsá, barometur og klokku frá Faroe Ship.

tekstur: **INGOLF S. OLSEN** -*PRESS*



**Skipsførarar:**
Bjarti Nattestad Petersen,
Magnus Pauli Lassen Nybo,
Tummas Petur Bisp,
Marni Svabo Dam,
Rúni Vestergaard Thomsen,
Jørgen Nielsen,
Petur L. Hansen,
Eyðstein Joensen,
Ragnar Hansen,
Kjartan Jacobsen.

**Virðislønir:**
1. Rúni Vestergaard Thomsen, gullur frá A. P. Møller.
2. Eyðstein Joensen, barometur og klokku frá Tryggingarfelagnum.
3. Jørgen Nielsen, lummaur frá Antares.

**Ídnisvirðisløn:**
Jørgen Nielsen, ur frá Søfartens Ledere.



**Hægsta miðaltalið hjá skiparum og skipsførarum:**
Heini Martin Jørðdal Niclasen fekk sekstant frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag fyri hægsta próvtalið.




# ELDRIVIN SPØL FRÁ IBERCISA

KSS ER UMBOÐ FYRI IBERCISA Í FØROYUM

**KSS** ER UMBOÐ FYRI **IBERCISA** Í FØROYUM, DANMARK, GRØNLANDI, SVØRÍKI, ONGLANDI, SKOTLANDI, ÍRLANDI, ÍSLANDI OG NORRA.

## FLEIRI FYRIMUNIR, LÆGRI KOSTNAÐUR

Eldrivnu spølini frá Ibercisa eru at finna umborð á yvir 120 trolarum kring heimin. Spølini hava fingið avbera góð ummæli. Spølini hava minni tørv á orku, og eru harvið bíligari í rakstri og meira umhvørvisvinarlig.






**Ynskir tú at hoyra meira um eldrivnu spølini?** Set teg í samband við okkum.

+298 472030

KSS@KSS.FO

WWW.KSS.FO

KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ



# Rein góðska úr norður Atlantshavi

www.cig.fo









Norðhavnin 8 · Postboks 329 · FO-726 Ánirnar · Føroyar
Tel. +298 20 70 00 · Fax +298 20 70 10
T-postur: cig@cig.fo · www.cig.fo



Annfinnur Garðalíð formaður

# BROT ÚR DAGBÓK

**04-04-2016**
**NLH**
Fiskivinnuráðstevna í NLH.

**05-04-2016**
**NLH**
Fiskivinnuráðstevna í NLH.

**06-04-2016**
**Fundur**
Fundur í FMU. Seinni um dagin fundur millum FMA og FMU.

**07-04-2016**
Fundur í Tinghúsinum
Hoyringsfundur um sjólógina.

**11-04-2016**
Excell Skeið tveir dagar.

**12-04-2016**
Fiskivinnuráðið.
Fundur í Fiskivinnuráðnum viðvíkjandi veiðu eftir botnfiski.

**14-04-2016**
Fundur millum FR og manningafeløgini.
Tosa um kvotukeyp á uppisølu.

**20-04-2016**
Kl. 10.00 Hotel Hafnia.
Fyrireikandi fundur í fylgibólkinum.
Kl. 14.00 Hoyringsfundur í Kaffihúsinum.

**21-04-2016**
Nevndarfundur
Nevndarfundur í FSN.

**28-04-2016**
Kl. 09.00 Fundur við FMA.

**03-04-2016**
**Fiskivinnuráðið**
Fundur nr. 5 í Fiskivinnuráðnum.

**06-04-2016**
Kl. 10.00 Blaðfundur í FSN.

**09-04-2016**
Fundur í Portugálinum
Kl. 13.00 Fundur í Portugálinum viðvíkjandi klagu um manningaskjal.

**11-04-2016**
Fundur í London
Kl. 14.00 Fundur millum FMU og ITF viðvíkjandi FOC støðuni. FAS kom ikki av FOC listanum á hesum sinni.

**16.-27.-04-2016**
Skeið.

**30-04-2016**
Blaðfundur í FSN.

**31-04-2016**
Kl. 13.00 Tíðindafundur í Fiskimálaráðnum viðvíkjandi uppisølu.

**02-06-2016**
Fundur í Trygdargrunninum.

**03-06-2016**
Nevndarfundur í FSN.

**08-06-2016**
Fundur í Fiskimálaráðnum.

**09-06-2016**
Fundur við FMR (samsýning SSL – FG).

**10-06-2016**
Fundur í FSN. FSN – MF – FR.

**14-06-2016**
Fundur við FMR viðvíkjandi V & B.

**15-06-2016**
Blaðfundur á FSN.

**16-06-2016**
Arbeitt heimanifrá.

**21-06-2016**
Fundur millum FSN – Skansi.
Gjørt semju viðv. §11 Skeiðsútreitslum.

**22-06-2016**
Skeið á FSN.
Skeið í Individuel forhandling og personsprofil. (Søfartensledere).

**23-06-2016**
Fundur á FSN.
Millum FSN og Søfartensledere.

**24-06-2016**
Prógvhandan á Vinnuháskúlanum.



22. juni hildu umboð fyri Søfartens Ledere skeið um samráðingarteknikk.



Páll Hansen formaður

# BROT ÚR DAGBÓK

**05-04-2016**
**Norðurlandahúsið**
Kveikjarafundur. Fundur sum Vinnuhúsið, Nótaskip og Reiðarafelagið - fyri innbodnum. Har vóru 6 fyrilestrarhaldarar, har spurningurin um útlutan av fiskirættindum og fígging av fiskivinnuni varð viðgjørdur. Seinnapartin. Sp/f Fakfelag kunnaði hini feløgini um keyps tilgongdina í Lív.

**06-04-2016**
**MF**
Faroese Maritime Unions hevði eftirmeting av fundi við ITF í Keypmannahavn, og um hvussu mann fyrireikar seg til næsta fund í London í mai. SVS var eisini á fundinum og varð kunna um støðuna.

**07-04-2016**
**MF**
Fundur við KAF um húsavørðar, nú kommunurnar hava yvirtikið eldraøki.

**12-04-2016**
**Salingarhella**
Fundur í arbeiðsbólkinum Maritimar Føroyar. Tosað varð um sjóvinnupolitikk.

**13-04-2016**
**Vinnuhúsið**
Fundur millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini, nú løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskap 2016 er lýst.

**18-19-4-2016**
**Hotel Hafnia**
NMF-fundur varð hildin saman við okkara skandinavisku kollegum á Panorama.

**29-04-2016**
**MF**
Nevndarfundur. Kunna varð millum annað um fundin í Keypmannahavn um FAS/FOC, har nakrir av okkara kollegum framvegis ynskja okkum á FOC. 4 mál vóru til støðutakan, millum annað 6. frívikan hjá teimum, sum sigla hjá Vørn. Upplegg til komandi samráðingar við Føroya Arbeiðsgevarafelag. Luttøka í kvotakeypið var eisini uppi og vendi.

**06-05-2016**
**FSN**
Mið og Magn blaðfundur. Víst var millum annað á, at fleiri av myndunum í síðsta blaði vóru sera reyðar. Tosast skal við prentsmiðjuna um hendan trupulleikan. Avtalað varð, hvørjar greinar skulu verða í komandi blað.

**10-05-2016**
**Vinnuháskúlin**
Fundur í Maritima útbúgvingarráðnum. Tosað varð um maskinmeistaraaspirantar. Kannan av, hvussu hetta fer fram í øðrum skúlum í okkara grannalondum. Samstarv við TST og TSK. Komið var eisini inn á bachelor støði.

**20-05-2016**
**MF Nevndarfundur**
Kunna varð um fund í London ITF/FOC. Til støðutakan var millum annað sáttmálaupplegg til nýggja avtalu millum FAG og MF. Samtykt varð eisini at siga sáttmálan við SSL upp. Hesar samráðingarnar byrja eftir summarfrítíðina.

**23-05-2016**
**FSN**
Blaðfundur. Tosað varð nógv um FAS/FOC og tær greinar sum snúgva seg um hetta evni.

**25-05-16**
Als-Húsið
Nevndarfundur í inntøkutrygdini. Tosað bleiv m.a um búskaparligu gongdina, fíggjarætlanina og meginreglur fyri eginognini.

**30-05-16**
**FSN**
Mið og Magn blaðfundur. Kunnað bleiv um, hvussu gekst við teimum ymisku greinunum.

**31-05-16**
Vinnuhúsið
Samráðingarfundur millum FAG og MF um sáttmála fyri meistarar á landi. Dagurin var avsettur til hendan fundin. Út á seinnapartin varð semja undirskrivað millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Maskinmeistarafelagið. Lønin hækkar við 2,2 % 1. juni í ár og við 2,3 % 1. juni næsta ár.

**07-06-16**
**Hotel Hafnia**
Umboðsmannafundur hjá Realinum. Stjórnin framlegði frágreiðing og roknskap. Endamálið hjá stovninum er at veita lán við veð í fiskiførum, farmaskipum, ferðamannaskipum, flótandi eindum, førum í frálandavinnu og fiskaaling við heimstaði í Føroyum.

**08-06-16**
**Vinnumálaráðið**
Fundur millum landsstýrismannin í vinnumálum og SP/F Fakfelag, Ognarfelagið um formligar, praktiskar forðingar, áðrenn sjálva yvirtøkuna av Lív. Semja var millum partarnar um, at vinnumálaráðið skuldi senda tíðindaskriv út.

**10-06-16.**
**FSN**
Fundur millum yvirmannafeløgini og Føroya Reiðarafelag um endaliga samanskriving av sáttmálanum, semja var millum partarnar á hesum fundi.

**22-06-16**
Løgmannsskrivstovan
Fundur í maritima arbeiðsbólkinum. Tikið varð samanum tað, sum er viðgjørt higartil, og hvat skuldi viðgerast eftir summarfrítíðina.

**24-06-16**
Vinnuháskúlin
Fyrrapartin prógvahandan á skúlanum. Seinnapartin: Nevndarfundur. Fýra mál til kunning, m.a Lív, samanskriving av sáttmála. 5 mál til støðutakan. Millum annað komandi sáttmálasamráðingar við FMR um SSL, óbrúktir fiskidagar.



Marita Rasmussen og Páll Hansen undirskriva semju

tekstur: Grækaris D. Magnussen -PRESS

BRENNIDEPILIN



# Høgni Hansen

**Føddur:** 20.08.69

**Parlagsstøða:** Giftur vid Duritu Rógvadóttir Hansen

**Børn:** Malena, Petra, Rannvá og Rói

**Útbúgving:** Lívsins skúli uppá tann harða mátan. Skiparaskúla í Klaksvík

**Starv:** Skipari á Fagraberg FD 1210

**Hvussu heldur tú útlitini vera hjá føroyskum skiparum í dag?**
Ikki góð í Føroyum. Vit eru alt ov lítið úti um okkum úti í stóru verð við fiskiskipum. Tad burdu verið føroyingar á brúnni á nógv fleiri fiskiskipum uttanlands.

**Hvør er størsta avbjóðingin hjá einum skipara?**
At halda skil á øllum reglum og lógum sum vera kroyst niður yvir okkum, tað er vorðið eitt sindur ov nógv av tíð góða.

**Nær vart tú fyrstu ferð til skips og við hvørjum?**
Vid Áarberg við snellu í 1980. Eg mundi doyð í sjóverki - og fái sjóverk enn.

**Hvat hevur verið longsti túrur tín til skips?**
Var fleiri langar túrar í 80'unum vid Sundaberg. Fimm mánaðar úti og eina viku heima. So aftur fimm mánaðar úti…

**Hvat gert tú í frítíðini?**
Haldi frí í Spania fyri at fáa heilsubót (gikt og eksem).

**Hvat slag av bili hevur tú?**
Range Rover Sport.

**Hvørja teldu hevur tú?**
iMac.

**Hvør er besta bókin/rithøvundur, tú hevur lisið?**
Stieg Larsson.

**Hvønn tónleik/sang dámar tær best?**
Bon Jovi.

**Hvør er besti filmur tú hevur sæð?**
Mær dámar best action-filmar.

**Hvat kann gleða det í gerandisdegnum?**
Tá konan akkurát hevur vaskað øll húsini og stendur klár við døgurðanum, tá eg komi inn. :-)

**Hvat kann øsa teg í gerandisdegnum?**
Ørvitis útalilsir frá búskaparfrøðingum.

peturlarsen.fo

# FYRI TYKKUM
# HVØNN MORGUN

NiNG · Tel +298 215 315

BAADER Food Processing Machinery
fomaco FOOD MACHINERY COMPANY
MOSCA STRAPPING SYSTEMS
euskan++ FISH HANDLING SYSTEMS

PETUR LARSEN
Since 1971

Petur Larsen Pf · Bakkavegur 8 · 530 Fuglafjørður · Tel 775 775 · pl@pl.fo

# FØÐINGARDAGAR



## MASKINMEISTARAFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Jóannes Norðberg, Vágur | 8/10-1956 | 60 ár |
| Heri Mikkelsen, Strendur | 9/9-1966 | 50 ár |
| Marner Egholm, Vestmanna | 26/9-1966 | 50 ár |
| Stig Hansen, Argir | 30/9-1966 | 50 ár |
| Kristian M. Eliasen, Klaksvík | 5/10-1966 | 50 ár |
| Emil við Á, Tórshavn | 7/10-1966 | 50 ár |
| Jóhann Fagraklett, Kollafjørður | 28/10-1976 | 40 ár |
| Bárður Zachariasen, Skáli | 12/9-1986 | 30 ár |
| Magnus Hendriksson Olsen, Runavík | 26/10-1986 | 30 ár |
| Beinir Danielsen, Rituvík | 31/10-1986 | 30 ár |

## SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Dánjal Johan Larsen, Porkeri | 19/10-1946 | 70 ár |
| Óla Kristian Hansen, Toftir | 14/9-1956 | 60 ár |
| Torbjørn Durhuus, Hoyvík | 17/9-1956 | 60 ár |
| Ólavur Groth Olsen, Gøta | 17/9-1956 | 60 ár |
| Súni Simonsen, Tórshavn | 21/9-1956 | 60 ár |
| Súni Clementsen, Tórshavn | 16-10-1956 | 60 ár |
| Sveinur S. Poulsen, Hvalba | 28/10-1956 | 60 ár |
| Jørmund Olsen, Fuglafjørður | 30/10-1956 | 60 ár |
| Bogi Poulsen, Tórshavn | 30/10-1956 | 60 ár |
| John E. Johannesen, Hvalvík | 7/9-1966 | 50 ár |
| Jóhan Jacob Jakobsen, Vestmanna | 30/9-1966 | 50 ár |
| Henning Simonsen, Sørvágur | 20/10-1966 | 50 ár |
| Sámal Clementsen, Húsavík | 14/9-1976 | 40 ár |
| Helmar Lassen, Klaksvík | 16/9-1976 | 40 ár |
| Rúni Sørensen, Viðareiði | 16/9-1976 | 40 ár |
| Petur Larsen, Norðagøta | 1/10-1976 | 40 ár |

## Áheitan!

Bæði Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið hava ávísar trupulleikar við ófullfíggjaðum limalistum. Tað eru serliga upplýsingar um teldupostadressur, sum vanta.
Við hesum heita feløgini tí á limirnar, sum ikki longu hava gjørt tað, um at senda teimum limaupplýsingarnar – navn, bústað og teldupostadressu.

Upplýsingarnar til Føroya Skipara- og Navigatørfelag skulu sendast til **fsn@fsn.fo.**

Upplýsingarnar til Maskinmeistarafelagið skulu sendast til **mf@mf.fo**.



- Heldur enn at brúka tímalønina á landi átti at borðið til at brúkt minstulønina sum útrokningargrundarlag fyri sjúkradagpengunum, heldur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

# Sjúkradagpengarnir til sjófólk eiga at broytast

teksturr: **ØSSUR WINTHEREIG** *-PRESS*

Verandi skipan við sjúkradagpeningi eigur at verða broytt, tí hon leggur ikki upp fyri arbeiðsviðurskiftunum hjá sjómonnum og fiskimonnum.

Tað heldur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Í dag umsitur Trygdargrunnurin vegna tað almenna sjúkradagpengar til sjófólk við føroyskum fiskiskipum – til dekkarar, teir í maskinunum og teir á brúnni.

Tá ein sjómaður kemur sjúkur í land, hevur hann rætt til 590 krónur um dagin í sjey daga viku, umframt frítíðarløn. Í alt verður tað 680 krónur um dagin ella 4.760 krónur um vikuna.

Skipanin við sjúkradagpengum til fiskimenn hevur áður verið umsitin av tí, sum æt Lønjavningarstovnan. Trygdargrunnur Fiskimanna hevur tikið yvir tær uppgávur, sum Lønjavningarstovan hevði.

Fíggingin av sjúkradagpengunum til fiskimenn er ein vanlig almenn skipan, sum verður fíggjað yvir fíggjarlógina. Í 2016 var játtanin 4,6 milliónir krónur.

Hesin sjúkradagpeningur kann verða goldin í í mesta lagi í 75 dagar. Eftir hetta tíðarskeiðið tekur vanliga sjúkadagpeningaskipanin yvir og er upphæddin á leið tann sama um vikuna.

Grundarlagið fyri útrokningini, sum Trygdargrunnurin rindar eftir, er 60 prosent av tímalønini á landi.

Formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag heldur, at tað er ikki rætt at brúka tímalønina á landi sum grundarlag.

-Tað ber als ikki til samanbera arbeiðið umborð á einum fiskiskipi við vanligt arbeiði á landi. Vit arbeiða nógv fleiri tímar og eru til arbeiðis í 24 tímar um samdøgrið, sigur Annfinnur Garðalíð.

- Heldur enn at brúka tímalønina á landi átti at borð til at brúkt minstulønina, sum útrokningargrundarlag, heldur hann.

Minstalønin fyri fiskimenn er 1050 krónur um dagin og hevði tað sostatt verið 7.350 krónur um vikuna ímóti núverandi 4760 krónur við frítíðarløn.

# Smidligari skipan

tekstur: **INGOLF S. OLSEN** *-PRESS*

Eyðgunn Samuelsen, almannamálaráðharri, arbeiðir við eini ætlan um at samansjóva broytadagpengalógina og lógina um sjúkratrygd.

Við hesum skal skipanin gerast smidligari hjá fiskimonnum og -kvinnum, sum gerast sjúk, tí tað verður bert ein skipan og bert ein hurð á fara á.

Í dag hevur fiskimaður, sum fer sjúkur í land, rætt til útgjald úr Trygdargrunninum teir fyrstu 75 dagarnar og síðani úr dagpengaskipanini í 205 dagar.

Eftir ætlan skal nýggja skipanin verða klár at virka í heyst.

PENSJÓN

trygging.fo



Vit føra tína pensjón

# trygt í havn

Sum limur í Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur tú møguleika frítt at velja, hvar tú ynskir at hava tína pensjóns-samansparing og lívstrygging.



**Endamálið er at tryggja eina munagóða samansparing**, sum er við til at leggja lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**

**Hevur tú spurningar,** ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, so set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR